# GERÐABÓK

**Dato:** 28. mai 2020 **Kl**. 18:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 87/20 – 115/20**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Magnus Dam

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Barbara Vang

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 87/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 348 |
| 88/20 | 19/00083-1 | Bátahylur í Álakeri | 350 |
| 89/20 | 20/00866-4 | Umsókn frá Articon um at víðka leiguøkið á Sundi | 356 |
| 90/20 | 17/03619-13 | Matr. nr. 91v, Kollafjørður. Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa. | 359 |
| 91/20 | 20/01496-2 | Matr.nr. 255el, Kirkjubøur,Argir. | 361 |
| 92/20 | 20/01390-2 | Matr.nr. 139f, og matr.nr. 139ag. Søkt verður um loyvi til víðarisølu av vinnustykkjunum. | 363 |
| 93/20 | 20/00491-1 | Umvæling av Skúlanum á Argjahamri | 365 |
| 94/20 | 17/04063-1 | Heimild til at reisa verjumál | 367 |
| 95/20 | 20/00824-4 | Bráfeingisjáttan til neyðuga útgerð - Barnatannrøktin | 370 |
| 96/20 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 372 |
| 97/20 | 18/00009-1 | Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll | 376 |
| 98/20 | 18/03857-2 | Undrið FF : Virksemi og hølisviðurskifti felagsins í Gundadali | 386 |
| 99/20 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 389 |
| 100/20 | 14/00949-2 | Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu | 400 |
| 101/20 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 406 |
| 102/20 | 20/00097-1 | Ústykking á Velbastað | 416 |
| 103/20 | 18/00173-1 | Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali | 419 |
| 104/20 | 18/03494-5 | Umsókn um grundøki til vardar bústaðir – Sambýli í Reynstúni | 423 |
| 105/20 | 19/00558-2 | Træplanting 2019, løguætlan 6275 | 430 |
| 106/20 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 433 |
| 107/20 | 20/01635-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2019 | 438 |
| 108/20 | 20/01383-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2019 | 440 |
| 109/20 | 15/02638-18 | Kommunuætlanin | 442 |
| 110/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 449 |
| 111/20 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 451 |
| 112/20 | 20/01536-2 | Ólavsøkan 2020 | 468 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 113/20 | 20/01634-1 | Økt reingerð á dagstovnaøkinum í sambandi við koronasmittufyribyrging | 470 |
| 114/20 | 19/04118-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga | 472 |
| 115/20 | 20/00198-3 | Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Vælveruhús | 475 |

| | Blað nr.: 348 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 87/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 88/20 Bátahylur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 3/19 | 19/00083-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 4/19 | 19/00083-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 6/19 | 19/00083-1 |
| 4 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 36/19 | 19/00083-1 |
| 5 Vinnunevndin | 27.06.2019 | 40/19 | 19/00083-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 217/19 | 19/00083-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 187/19 | 19/00083-1 |
| 8 Vinnunevndin | 13.01.2020 | 5/20 | 19/00083-1 |
| 9 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 13/20 | 19/00083-1 |
| 10 Vinnunevndin | 26.02.2020 | 20/20 | 19/00083-1 |
| 11 Vinnunevndin | 11.05.2020 | 44/20 | 19/00083-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 111/20 | 19/00083-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 88/20 | 19/00083-1 |

**Upprunin til málið: Upprunin til málið:**
Býráðið hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió kr til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri.
Tað hevur verið tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn í nógv ár. Við ársenda 2018 vóru tað 200, sum stóðu á bíðilista til bátapláss, og sum øll hava goldið kr. 2.000 í depositum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavn og á Argjum eru tilsamans 550 bátapláss. Tað hava ymiskar ætlanir verið frammi um at gera bátahavn, men ongin hevur borið á mál.
Síðani simuleringar vóru gjørdar av bátahyli í Álakeri í 2006, er havnarlagið nógv útbygt, og tann nýggi molin kemur nógv longur vestur. Simuleringar vísa, at havnaútbyggingin betrar um kyrruna í Álakeri.
Nýggj simulering eigur at verða gjørd, áðrenn farið verður víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í byggisamtyktini er økið lagt av til havnarøki.
Tá bygt verður út á sjógv, skal loyvi fáast frá friðingarmyndugleikunum.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru avsettar 2 mió. til smábátahavn í Álakeri.
Metingar av einari bátahavn í Álakeri vísa, at tað verður pláss fyri millum 200- og 250 bátum, alt eftir bátastødd og hvussu havnin verður skipað við flótibrúgvum.
Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er at gera simulering av Álakeri, fyri at vita um- og hvussu tað ber til at fáa tað kyrt. Kostnaðurin fyri at gera eina simulering er kr. 200.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☒ Nei ☐

**Tilmæli:**
Mælt verður til at gera byggiprogram.
Eisini verður mælt til at gera simuleringar, at fíggja av íløgum fyri bátahyl í Álakeri.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Simuleringar:**
DHI hevur gjørt simuleringar.
Longri brimgarðurin er, sum verjir bátahylin, kyrrari verður í bátahylinum. Royndir eru gjørdar við 3 ymiskum longdum.
Í fyrsta uppskotinum er innsiglingin til bátahylin 70 m, í næstu royndini er innsiglingin 50 m breið og í triðja uppskotinum er innsiglingin 30 m breið.
Smælari innsiglingin er, betur verður kyrran í bátahylinum, men munurin á kyrruni har innsiglingin er ávikavist 50- og 30 metur er lítil.
Simuleringar er gjørdar við at samanbera kyrruna av verandi bátaplássum í Havn, við bátaplássini í nýggju bátahavnini í Álakeri.
Um tann loysnin, har innsiglingin er 50 metur verður vald, sigur simuleringin, at kyrran verður eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð.
Ein leinging av molanum upp á 20 metur er mett at kosta kr. 1,5 mió

**Byggiprogram (úrdrag):**
Umleið 230 bátapláss, sum øll eru við flótibrúgvar.

Brúgvar og bátabummar vera av sama slagi, sum nýggjasta brúgvin á Skálatrøð.

Økið á landi verður víðka við 2.000 $m^2$.

Fram við sjóvarmálanum verður gjørdur ein 120 m langur grótskrái upp til lendið omanfyri.

Neyðugt verður at dýpa eitt umleið 100 m stórt øki útfyri neystini á vestaru síðu á Álakersvík niður á 2 m dýpi.

210 m langt grótkast, sum er 4 m. høgt.

Nýggjur dráttur til kappróðrarbátar.

Streymúttøk og vatn til bátar, verður á øllum brúgvunum.

Arbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Licitatión í februar 2020.

Arbeiðið liðugt í apríl 2022.

**Loyvir:**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Byggisamtyktin má regulerast.
Byggiloyvi.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019,
at projektera og bjóða arbeiðið út
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tá projekteringin er liðug, er kanska rættast at leggja málið aftur fyri nevndina, har støða verður tikin til at bjóða arbeiðið út.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

| | |
|---|---|
| Avsett í fíggjarætlan 2019: | 2.000.000 |
| Brúkt til simuleringina | 112.000 |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | 345.000 |
| Eftir til projektering og fyrireiking | 1.543.000 |

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til:
at taka undir við byggiskránni, dagfest 20-05-2019
at projektera
at søkja um, og fáa neyðug loyvir.
at játta í mesta lagi kr. 1.543.000 til projektering og fyrireiking

**Vinnunevndin 27. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2020, eru 10 mió avsettar til bygging av smábátahavn í Álakeri.

Projekteringin er komin so langt, at arbeiðið væntandi kann bjóðast út primo mars 2020.

Í fyrsta umfari er ætlanin at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum.

**Tilmæli frá havnarmeistranum**: Mælt verður til at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Vinnunevndin 13. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og málið kemur fyri aftur í vinnunevndini á fyrst komandi fundi til kunningar.

**Ískoyti:**
Tað fyrsta byggistigið, sum er at gera brimgarðin og økið fram við sjóvarmálanum krevur ikki nógv arbeiðsfólk. Tað merkir, at tað helst eru fleiri fyritøkur, sum kunnu útføra arbeiðið. Ein máti at fáa fleiri fyritøkur at bjóða, er at bjóða út í almennum útboði.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Í staðin fyri at bjóða út í innbodnari licitatión, verður mælt til at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Málið bleiv útsett.

**Vinnunevndin 26. februar 2020:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út í innbodnari licitatión millum 7 arbeiðstakarar og licitatiónin var hildin hin 28. apríl á Havnaskrivstovuni. Hesi tilboð komu inn (j.nr. 19/00083-16):

| **Arbeiðstakari** | **Tilboðsupphædd** | |
|---|---|---|
| SP/F Plan | kr. | 24.683.681,30 |
| SP/F Maskingrevstur | kr. | 26.119.645,00 |
| Andrias Berg SP/F | kr. | 17.604.145,00 |
| Sp/f Ian Rasmussen | kr. | 15.270.060,00 |
| SP/F Grettir | kr. | 17.494.690,00 |
| P/F Tórhall Hansen | kr. | 14.006.468,00 |
| Spf Konsax | kr. | 16.222.063,27 |
| Sp/f Ian Rasmussen, Alternativt boð | kr. | 14.007.863,00 |

Ráðgevin hevur eftirkannað tilboðini og mælir í skrivi dagfest 30/4, j.nr. 19/00083-17 til at taka av lægsta tilboð frá Tórhalli Hansen áljóðandi kr 14.006.468,00.

Tórshavnar Havn og ráðgevin hava havt innleiðandi samráðingar við P/F Tórhall Hansen um ymisk viðurskifti, m.a. tíðarætlanina. Tíðarætlanin fyri arbeiðstøkuna var upprunaliga sett til 8 mánaðir frá 1. mai 2020 og árið út. Vit eru farin framvið 1. mai 2020 og tí er ikki realistiskt at fáa arbeiðið liðugt til 31/12-2020. Tað tekur eisini tíð at starta arbeiðið upp, og summarfrítíðin stendur fyri framman. Mett verður tí, at ein tíðarætlan á 10 mánaðar frá 1. juli er meiri realistisk. Arbeiðið verður tá liðugt 30/4-2021.

Sum nevnt í málslýsingini umfatar útbodna arbeiðið at gera brimgarð og økið fram við landi, t.e. grótskrái, trappur, gongubreyt, kantsteinar, fundament til ljóssteyrar og festir til bátabrúgvar.
Tað sum síðani er eftir at gera, er at útvega sjálvar bátabrúgvarnar, tekniskar installatiónir (el og vatn) umframt liðugtgerð av økinum á landi, so sum avrætting og regulering av lendi, avvatning, asfaltering v.m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

| | |
|---|---|
| **Kostnaður** | |
| Tilboð Arbeiðstøka P/F Tórhall Hansen | 14.006.468 kr |
| Ókent (8%), fyrireiking og projektering, fakeftirlit og byggileiðsla | 2.068.500 kr |
| Aldusimulering | 112.000 kr |
| **Kostnaður í Alt** | **16.187.000 kr** |
| | |
| **Fígging** | |
| Avsett á FÆ 2019 til bátahyl í Álakeri | 2.000.000 kr |
| Flutt til bylgjubrótara í Kaldbaksbotni | -345.000 kr |
| Flutt til bátadrátt í Nólsoy | -600.000 kr |
| Avsett á FÆ 2020 til bátahyl | 10.000.000 kr |
| **Tøk fígging í alt í 2020** | **11.055.000 kr** |
| | |
| **Írestandi fígging** | **5.132.000 kr** |
| | |

Á langtíðaríløguætlanini eru í 2021 avsettar 15 mió. kr. til bátahyl í Álakeri.

**Tilmæli**
Havnameistarin mælir til:
- At taka av tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 14.006.467,00 og gera sáttmála um arbeiðið
- At játta kr 10.000.000 av løgukarminum í 2020 deild 7476 smábátahavnir.
  At avseta og játta kr 5.132.000 til arbeiðið av íløguætlanini fyri 2021.

**Vinnunevndin 11. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fara í samráðingar við arbeiðstakaran um møguleikan at flyta grótið til bátahylin við báti av Glyvursnesi.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá vinnunevndini, ið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Málið beint í býráðið umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi byggiloyvi til bátahylin í Álakeri, so hevur kommunan fingið eina umsókn frá Tórshavnar Havn, j.nr. 20/01445. Hendan umsókn verður viðgjørd, lýst og løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið í avvarandi nevndir áðrenn endaliga støðutakan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og ongari blankari og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 89/20 Umsókn frá Articon um at víðka leiguøkið á Sundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 28/20 | 20/00866-4 |
| 2 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 50/20 | 20/00866-4 |
| 3 Vinnunevndin | 28.04.2020 | 39/20 | 20/00866-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 112/20 | 20/00866-4 |
| 5 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 89/20 | 20/00866-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Articon um at leiga 3.800 ferm á havnarlagnum á Sundi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Articon ætlar at uppseta 10 sementsiloir á økinum, sum teir nú leiga til goymslu av sandi og skervi, er ynski um at víðka um tað leigaða økið við 3.800 m$^2$.

Økið talan er um, er tann eystasti parturin av verandi øki á Sundi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í byggisamtyktini ásett sum eitt B1 øki, í *sum heild verður lagdur av til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Líka síðani byrjan hevur sjálv bryggjan verið brúkt til bulkvørur, t.e. sandur, skervur og skrott, umframt at onnur skip.
Í 2014 var leiguavtala gjørd við Articon um leigu av 4.000 m$^2$.
Tann 30. oktober 2014 samtykti býráðið at gera ein 25 ára leigusáttmála við P/F Articon, og leigumálið varð víðkað til 10.000 m$^2$ av økinum.
Tann 19 apríl 2016 samtykti býráðið at gera eitt ískoyti til leigusáttmálan, har leigumálið varð víðkað til 12.000 m$^2$.
Um leiguavtala verður gjørd við Articon um økið, er ikki pláss til fleiri leigarar á tí økinum, og tann samlaða víddin, sum verður leigað til Articon, er 15.800 m$^2$.

Articon hevur brúkt tveir bygningar á økinum, annar verður brúktur sum goymsla, meðan hin verður brúktur til framleiðslu av elementum og rúmmodulum til bústaðarbygging.

Uppseting av sementsiloum hóskar væl til tað virksemið, sum er á økinum, og til galdandi byggisamtykt.

Fyri at tryggja, at iløgurnar í havnaløgum verða afturgoldnar av brúkarunum, verður arbeitt við at gera nýggjar leiðreglur um áseting av leigukostnaði.
Hesar leiðreglur verða galdandi fyri øll leigumál av grundøkjum á havnarlagnum, og tí er rættast at boða umsøkjaranum frá, at nýggjar leiðreglur fara at koma.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við ískoyti til leigusáttmála j.nr. 20/00866-8.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mælir til at bjóða økið alment út.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í telduposti hin 17. apríl 2020 boðar Articon frá, at tey ikki halda tað verða rímiligt, at broyta treytirnar fyri leigusáttmálan nú ið økið skal víðkast, og Articon hevur munnliga boðað frá, at tey ikki vilja skriva undir ískoyti. Articon sipar til fylgjandi áseting í § 2 í ískoytinum:

*"Nýggjar leiðreglur til áseting av leigukostnaði fyri fyritøkur á havnarøkið fara at koma. Broytingarnar fara at snúgva seg um umferðarábyrgd (omsætningsgaranti). Nýggju leiðreglurnar um áseting av leigukostnaði verða tá galdandi fyri fyriliggjandi leigumál og skulu hesar fráboðast leigarunum seks mánaðir, áðrenn tær fáa gildi."*

Articon vísir á, at í høvuðssáttmálanum eru gjaldstreytir ásettar, og um nakað skal broytast, eigur tað at verða gjørt mótvegis øllum leigarum samstundis, og ikki ein og ein sáttmála, tá ið ein broyting í sáttmálanum verður gjørd.

Havnameistarin vísir á, at ásetingin skal skiljast sum ein kunning um, at arbeitt verður við nýggjum leiðreglum fyri ásetan av leigugjøldum, og at ásetingin tískil ikki er ein broyting av verandi treytum. Nýggjar treytir skulu fráboðast leigarum við 6 mánaða freist.
Havnameistarin metir, at tað nettupp er neyðugt at kunna um hetta nú, ið nýggjur sáttmáli (ískoyti) verður gjørdur stutt frammanundan eini møguligari broyting í treytunum. Verður hinvegin ikki kunnað um hetta, kann leigarin framføra, at útleigarin ikki hevur kunnað um komandi broyting, hóast útleigarin visti um hesa, og harvið kann tað verða torførari at fremja broytingina.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at nevnda ásetingin verður standandi.

**Vinnunevndin 28. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Boga Andreasen at beina málið aftur í vinnunevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 90/20 Matr. nr. 91v, Kollafjørður. Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 116/20 | 17/03619-13 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 90/20 | 17/03619-13 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá eigara dagfest 12.05.2020

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Viðv. matr.nr. 91v, Kollafjørður. Vídd 640m2. Keypsprísur kr. 300.806,40
Grundstykkið er tinglýst verandi eigara 17.01.2019
Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

Snarskivan hevur í tveimum umførum útlutað stykkir í útstykkingini so hvørt sum grundstykkir eru komin innaftur. Hetta varð gjørt á tann hátt, at tey sum ikki fingu tillutað grundstykkir í fyrsta umfari, fingu møguleika til at verða við í nýggjari útlutan. Øll sum teknaðu seg til upprunaligu útlutanina, hava fingið grundstykkið í boðið

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 300.806,40 og síðani at selja grundstykkið í fríðari sølu til ásettan minstaprís sum er samsvarandi hesum prísi kr. 300.806,40

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 91/20 Matr.nr. 255el, Kirkjubøur,Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 115/20 | 20/01496-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 91/20 | 20/01496-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn dagfest 04.05.2020.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Viðvíkjandi matr.nr. 255el, Kirkjubøur Argir. Tinglýstur eigari Sp/F NN Holding.

Eigari søkir um heimild til at selja grundstykkið til Sp/f Mark Kongavarða.

Upplýst verður, at talan er um 100% dótturfelag til Sp/F NN Holding, og at verkætlanin um bygging av leigíbúðum verður fullførd í nýggja felagnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** 19/04857.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Skeytisásetingar.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at loyva, at ognin verður skeytað til Sp/F Mark Kongavarða. Víðarisølu skeytið skal vísa til verandi tinglýstu servituttir, og skal søluprísurin vera hin sami sum í uppruna skeytinum kr. 1.648.500,00

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 92/20 Matr.nr. 139f, og matr.nr. 139ag. Søkt verður um loyvi til víðarisølu av vinnustykkjunum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 114/20 | 20/01390-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 92/20 | 20/01390-2 |

**Upprunin til málið:**
Advokatur eigarans, søkir í teldubrævi 23.04.2020, um loyvi til víðarisølu av vinnustykkjunum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Vinnustykkið matr.nr. 139f, sum var til víddar 5.037m2, er nú býtt sundur í tvey vinnustykki. Matr.nr. 139f, 2.519m2 og matr.nr. 139ag, 2.518m2.
Mál 17/03082. Býráðssamtykt 24.02.2018 at loyva sundurbýti.

Sp/F 06.02.97 eigur báðar ognirnar. Í samband við ættarliðskifti avhendar verandi partaeigari partapeningin til tveir synir sínar ( helmingin í part ). Synirnir stovnseta hvør sítt nýtt smápartafelag, sum kemur at standa sum eigari fyri hvørjum sínum vinnustykkið. Verandi partafelag verður síðani tikið av.

Verandi skeytið er tinglýst 25.08.2008. Sambært grein 3. Punkt. d og e, er tinglýstur servituttur um 2 ára byggifreist, og kann kommunan til eina og hvørja tíð krevja sær ognarættin til vinnustykkið aftur móti at endurrinda eigaranum avtalaða keypspeningin.
Er nøkur bygging farin fram, endurrindar seljarin keyparanum harumframt skjalprógvaðar útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda. Semjast partarnir ikki um hetta og/ella um endurgjaldið, verður tað at áseta av einum gerðarrætti, har Tórshavnar kommuna útmeldar 1 lim, keyparin 1, meðan triði limurin, ið er formaður, verður útnevndur av Føroya Rætti. Renta verður ikki goldin av keypspeningi ella skjalprógvaðum útreiðslum, ið seljarin endurrindar.
Vinnustykkið liggur óbygt, og fyriliggur onki byggiloyvi heldur.

**Lógir, ásetingar o.a.** Skeytisásetingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik frá ásetingum í skeyti.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá Advokati við viðheftum uppruna skeyti. Skjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 364<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at loyva at ognirnar verða skeytaðar nýggjum partafeløgum í samband við ættarliðsskifti. Nýggju skeytini skulu vísa til verandi tinglýstu serivuttir, og skal søluprísurin vera hin sami sum í uppruna skeytinum. Kr. 620,05 fermeturin.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 93/20 Umvæling av Skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 49/20 | 20/00491-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 133/20 | 20/00491-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | | | 20/00491-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 93/20 | 20/00491-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Í samband við 5 ára eftirlit í skúlanum á Argjaharmi, varð staðfest, at trupulleikar vóru við tekjuni, vindeygunum og pørtum av klædninginum á bygninginum umframt aðrir smærri manglar.

Sýn og meting fyriliggur av skaðunum á bygninginum, og semja er gjørd við Betri Trygging um endurgjald fyri umvæling av vindeygunum og fasaduni. Harumframt hava samráðingar verið við Articon um at umvæla skaðarnar á tekjuni, og uppskot til semju fyriliggur, sum báðir partar skulu taka støðu til.

Betri Trygging hevur játtað at rinda endurgjald fyri skaðan á fasaduni v.m. áljóðandi kr. 2.463.672,30 v. mvg. og fyri umvæling av vindeygunum áljóðandi kr. 1.341.123.

Støða skal nú takast til, hvussu umvælingararbeiðið skal leggjast til rættis og peningur skal játtast til umvælingina.

Viðv. vindeygunum og fasaduni, hevur Húsaumsitingin biðið ráðgeva gera tilfar, ið lýsir ætlaða umvælingararbeiðið umframt kostnaðarmeting av umvælingini.

Viðv. tekjuni inniber uppskotið til semju við Articon, at Articon ger neyðuga umvælingararbeiðið, ið er mett til kr. 618.125, og verða útreiðslurnar til hetta býttar millum Tórshavnar kommunu og Articon við ávikavist 2/3 og 1/3.

Articon hevur bygt Skúlan á Argjahamri, og felagið hevur tikið sær av teimum flestu kanningunum, ið sýn- og metingarmaðurin hevur havt tørv á fyri at kunna skriva endaligu sýnsfrágreiðingina.

Articon hevur sostatt besta kunnleikan til, hvussu skúlin er bygdur, og verður tað mett at vera ein fyrimunur at lata Articon umvæla neyðug skaðarnar á skúlanum, nú hetta arbeiðið skal setast í gongd. Ætlanin at lata Articon umvæla skaðan á tekjuni talar eisini fyri at lata Articon standa fyri samlaða umvælingararbeiðinum.

Ætlanin er at fáa til vega eitt nøktandi projekt frá ráðgeva av neyðugu umvælingunum, at fáa til vega eina kostnaðarmeting og síðani fara í samráðingar við Articon um umvælingararbeiðið. Kann Articon gera arbeiðið fyri ein nøktandi kostnað, verður biðið um heimild at gera sáttmála við Articon um arbeiðið.

Bera hesar samráðingar ikki á mál – og liggur kostnaðurin, ið Articon bjóðar sær til at gera arbeiðið fyri, ov langt frá kostnaðarmetingini, er ætlanin at bjóða arbeiðið út millum aðrar arbeiðstakarar.

Skal arbeiðið at umvæla skúlan á Argjahamri koma í gongd í ár, er umráðandi, at støða skjótast gjørligt verður tikin til omanfyrinevndu viðurskifti.

**Skjøl**
Uppskot til semju við Articon um tekjuna
Sýnsfrágreiðing
Kanning frá vindeygum og úthurðum

Semja við Betri trygging um vindeyguni

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Væntast kann at upphæddin fyri vindeygu sum er frá 2016, er væl hægri í dag. Harumframt kann væntast at kostnaðurin fyri umvælingina av fasaduni v.m. verður nakað hægri enn 2,5 mió., av tí at endurgjaldið frá Betri Trygging er 25 % minni enn mettur kostnaður av umvælingini – hetta vegna frádrátt fyri nýtslu/aldur á bygninginum.

**Tilmæli:** Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Húsaumsitingini og leiðarin á Stjórnarskrivstouvni mæla fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til semju við Articon viðv. tekjuni og til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Articon um umvælingarnar av vindeygunum, fasaduni, v.m, tá ið kostnaðarmeting fyriliggur frá ráðgeva hesum viðvíkjandi.

Áðrenn umvælingararbeiðið verður sett í verk, verður málið lagt fyri aftur fíggjarnevndina við umbøn um neyðuga fígging og til tess at gera sáttmála um umvælingararbeiðið.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur so skjótt tað er klárt.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Málið útsett.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

# 94/20 Heimild til at reisa verjumál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.12.2017 | 32/17 | 17/04063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 320/17 | 17/04063-1 |
| 3 Eldranevndin | 14.05.2020 | 2/20 | 17/04063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 94/20 | 17/04063-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur er á at flyta heimild í mun til verjumál.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í heilsu- og umsorganartænastuni kunnu vera brúkarar, sum hava brúk fyri verju samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál.

Tørvurin á verjumáli kann eitt nú vera tann, at viðkomandi borgari ikki megnar at taka sær av sínum fíggjarligu viðurskiftum. Vanliga er tað tá avvarðandi, sum røkja hesa uppgávu. Tó kemur tað fyri, at borgarin ongi avvarðandi hevur, sum kunnu røkja hesa uppgávuna. Hetta gevur fleiri trupulleikar, tí viðkomandi kann ikki gjalda fyri heilivág, búpláss og aðrar neyðugar tænastur og veitingar.

Tá so er, hevur Almannaverkið fingið til vega verju til hesar borgarar umvegis Ríkisumboðið. Nú eldraøkið er lagt til kommunurnar at umsita, tekur Almannaverkið sær ikki longur av hesari uppgávuni í mun til eldri borgarar, men er tað kommunan, sum skal reisa verjumál.

Formliga er tað býráðið, sum kann heita á Ríkisumboðið um at seta í verk verjumál. Henda heimild í lógini kann tó latast víðari til fyrisitingina á avvarðandi øki. Almannamálaráðið hevur latið hesa heimild víðari til Almannaverkið og fyrisitingarstjóran har, og í praksis er tað umsitingin, sum útinnir uppgávuna.

Tað er skipað mannagongd fyri verjumál og hvørjar upplýsingar v.m., sum Ríkisumboðið skal hava til viðgerðina. Sambært Ríkisumboðnum kann ein slík viðgerð taka upp til eitt ár. Verður áheitanin og verjumál sett í verk, setir Ríkisumboðið verja til borgaran. Ríkisumboðið ber kostnaðin av verjanum.

Í løtuni er eitt ítøkiligt mál, har tørvur er hjá heilsu- og umsorganartænastuni at reisa verjumál. Hetta er fyrstu ferð, at kommunan hevur hesa støðu, síðani kommunan tók yvir eldraøkið. Mett verður tí eisini skilabest, at heimildin at heita á Ríkisumboðið um reisa verjumál verður latin víðari til fyrisitingina.

Býráðið kann lata heimildina víðari til avvarðandi fyrisiting soleiðis:

***Heimild***
*Vísasandi til lóg um verjumál frá 1. mai 2010 (anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne av værgemålsloven), flytur Tórshavnar býráð við hesum heimildina í § 16, stk. 1, nr. 5 til trivnaðarstjóran at reisa verjumál sambært §§ 5-10 í somu lóg.*

*Henda heimild er galdandi til onnur avgerð verður tikin.*

Henda heimild eigur eisini at verða tikin við í samlaðu heimildarætlanina hjá kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**§ 16.** Anmodning om værgemål eller om ændring eller ophævelse af værgemål, jf. §§ 5-10, kan fremsættes af
1) den pågældende selv,
2) dennes ægtefælle, børn, forældre, søskende eller andre blandt de nærmeste,
3) værgen eller en særlig værge,
4) bygderådet

5) byrådet eller
6) politimesteren.
7) Almannamálaráðið.
*Stk. 2.* Rigsombudsmanden kan uden anmodning behandle spørgsmål om ændring og ophævelse af værgemål, jf. § 9 og § 10, samt om værgebeskikkelse og ændring heraf.

**§ 5.** Der kan iværksættes værgemål for den, der på grund af sindssygdom, herunder svær demens, eller hæmmet psykisk udvikling eller anden form for alvorligt svækket helbred er ude af stand til at varetage sine anliggender, hvis der er behov for det.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla eldranevndini til at heita á býráðið um at geva heilsu- og umsorganartænastuni, um trivnaðarstjóran, heimild at reisa verjumál til borgarar samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál.

**Eldranevndin 11. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Í sambandi við bygnaðarbroyting í 2018 varð Heilsu- og umsorganartænastan sjálvstøðugt øki við egnum stjóra.

Býráðssamtyktin frá 14. des. 2017 sigur, at Heilsu- og umsorganastjórin, um trivnaðarstjóran, hevur heimild at seta í verk verjumál til borgarar samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál.

Orðaljóðið í delegatiónini eigur at broytast soleiðis at samsvar er við verandi bygnað. Tí skal heitast á Býráðið um at flyta heimildina at seta í verk verjumál til borgarar samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál frá trivnaðarstjóra til Heilsu- og umsorganarstjóran.

**Tilmæli:**
Vísandi til § 16, stk. 1, nr. 5 í lóg um verjumál, verður mælt til, at býráðið flytur heimildina í § 16, stk. 1, nr. 5 til Heilsu- og umsorganarstjóran.

**Eldranevndin 14. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 95/20 Bráfeingisjáttan til neyðuga útgerð - Barnatannrøktin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.04.2020 | 12/20 | 20/00824-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 97/20 | 20/00824-4 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 74/20 | 20/00824-4 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 95/20 | 20/00824-4 |

**Upprunin til málið:**
Fráboðan frá tannlæknastjóranum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tannlæknastjórin boðar 12. februar 2020 frá, at stóra røntgenappartið er gingið fyri, og at ráðiligt er ikki at umvæla tað. Talan eru 13 ára gamla útgerð, sum seinast varð umvæld fyri góðum ári síðani.

At henda útgerð ikki virkar ger, at tað er ikki møguligt at taka nøktandi tilfar, tá metast skal um í samband við tannrætting og um tenn og andlit búnast tey eiga. Hetta er týdningarmesta amboðið fyri at kunna taka røttu avgerðirnar um nær og hvussu farast skal fram – røntgenmyndir av øllum tonnunum og andlitið, umframt profll og hond røntgen.

Hitt røntgenapparat til tey lítli bíløtini er eisini farin at virka illa, tí fjórða hvør mynd er blonk. Harumframt er ein autoklavi frá 1998 óvirkin. Tveir aðrir eru, sum nýliga eru skiftir, men tørvur er á trimum. Autoklavar verða brúktir til sóttreinsan, har nýggjar rættningslinjur viðv. hygieinu mæla til vakuumatouklavar.

Tannlæknastjórin vísir á, at stovnurin hevur ikki fígging til endamálið, og at tørvur er á eykajáttan kr. 550.000, tá er flutningur, uppseting og mvg íroknað.

Vísandi til, talan er um bráðfeingisstøðu, har Barnatannrøktin ikki fær útint týdningarmiklar og lógarásettar partar av virkseminum, og sum kann ganga út yvir tannheilsuna hjá teimum børnum, ið tørva sertannlæknaviðgerð, er avgjørt at geva tannlæknastjóranum heimild at útvega útgerðina alt innanfyri kr. 550.000, og eftirfylgjandi at leggja mál um eykajáttan til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um barna- og ungdómstannrøkt

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at til ber ikki hjá trivnaðarnevndini at fíggja kr. 550.000 av øðrum kontum, sum nevndin varðar av á grein 2.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir trivnaðarnevndini til at heita á fíggjarnevndina um eykajáttan kr. kr. 550.000 til kontu 2310 Barnatannrøktin til útvegan av nýggjari útgerð.

**Trivnaðarnevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Vísast kann á fígging til útgerðina til Barnatannrøktina av avlopi í fyrisitingini 2019 soleiðis, kr. 145.000 av 1310 Býráðsskrivstovan kr. 200.000 av 1317 Heilsu- og umsorganarfyrisitingin og kr. 205.000 av 1313 Tekniska fyrisiting.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 372<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 96/20 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 58/20 | 18/04076-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 95/20 | 18/04076-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 74/20 | 18/04076-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 125/20 | 18/04076-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 123/20 | 18/04076-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 96/20 | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var størsta partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess at gera verkætlanina ítøkiliga, verður mett neyðugt at fáa nærri viðgerð av møguligum staðsetingum og krøvum til sjálvt listaverkið Andreu Árting til heiðurs, hetta eisini sum liður at útvega samlaðu fíggingina. Á løgukontu 6275 Fríðkan av býnum, L62038 eru kr. 300.000 tøkar. Aftrat eru nakrar tilsagnir um fíggjarligan stuðul frá uttanhýsis pørtum komnar til verkætlanina.

Tørvur er á at fáa neyvari staðfest, hvørji krøv skulu setast til staðseting og listaverk. Tørvur er harumframt á uppskoti um tilgongd at útvega sjálvt verkið. Liður í hesum er eisini at meta um hóskandi vavi av samlaðu verkætlanini, harundir kostnað.

Tað eigur at verða heitt á Listaráðið um skjótast til ber at geva tilmæli til nevndarviðgerð hesum viðvíkjandi, so at tilgongd at útvega listaverk og aðrar fyrireikingar í sambandi við staðsetingina annars kunnu byrja.

Um tilgongdin at útvega listaverk v.m. krevur fígging, verður hetta at leggja aftur fyri nevnd at taka støðu til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Listaráðið um uppskot til staðseting av listaverkinum og krøv annars bæði til staðseting og listaverk. Mælt verður eisini til at heita á Listaráðið um uppskot til tilgongd at útvega listaverkið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti**:
Tórshavnar listaráð hevur viðgjørt málið um staðseting av listaverkinum, umframt krøv til listaverkið og útveganartilgongd og hevur fylgjandi tilmæli.
---
*Viðv. staðseting*
*Listaráðið mælir til at verkið verður staðsett í Steintúni, treytað av at tað kann fáa hóskandi rúmd og pláss og ikki avmarkað til sjálvt torgið. Listafólkið skal kann arbeiða við staðseting í økinum.*

*Viðv. krøvum til listaverkið*
*Listaráðið mælir til at taka støði í nøkrum fáum krøvum, herundir boðskapinum um AÁ (kvinnujavnrættindi, sosialt rættvísti, áræði, áhaldni og sterk kvinnufyrimynd) og at verkið skal kennast fólksligt (ikki elitert), forvitnisligt og sjónligt í býarmyndini.*

*Viðv. útvegnar-/útboðstilgongd*
*Listaráðið mælir til at fara undir eina tilgongd har útvald yrkislistafólk fáa møguleika at luttaka í eini tilgongd, ið helst er í stigum. Einum undanumfari og so evt. eini millumstigi (tá móti ávísum gjaldi) og so endaligari tilgerð.*
---

Víðari tilgongd
Um samtykt verður at halda fram við verkætlanini fer Listabólkurin í kommununi, ið hevur ábyrgd av praktisku útveganini sbrt. galdandi reglugerð, undir útboðstilgongd at útvega listaverk. Hugsanin er at talan verður um innbodna tilgongd við einum undanumfari, og um valt verður at fara víðari til eitt annað

umfar við fleiri luttakarum, at hesir tá fáa eina ávísa samsýning fyri kappingarluttøkuna.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við útboðstilgongdini við støði í tilmælinum frá Tórshavnar listaráði.
Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanarnevndini mæla til at taka undir við tilmælinum og at játta 100.000,- kr. av kt. 6275, fríðkan av býnum, L00001 løgukarmur fyri árið, til L62038 standmynd/minnismerki um Andreu Árting og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í framflytingunum frá fíggjarárinum 2019, ið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini og býráðnum í næstum, verða ætlandi framflytingar frá m.a. kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli, á umleið 950 tkr.

Mett verður at partur av hesum kann vera flutt til at betra um fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini. Henda upphæddin er helst ikki nokk, men vil nú vera nøktandi grundarlag fyri at fara víðari við verkætlanini og byrja útveganartilgongdina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli til projektkontu L62038 – standmynd/minnismerki - Andrea Árting.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 376<br>Formansins merki: |

# 97/20 Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 19/18 | 18/00009-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 88/18 | 18/00009-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 41/19 | 18/00009-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 148/19 | 18/00009-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 194/19 | 18/00009-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 159/19 | 18/00009-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 277/19 | 18/00009-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.10.2019 | 291/19 | 18/00009-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 314/19 | 18/00009-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 37/20 | 18/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 41/20 | 18/00009-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 136/20 | 18/00009-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 120/20 | 18/00009-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 171/20 | 18/00009-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 97/20 | 18/00009-1 |
| 16 Býráðsfundur | | | 18/00009-1 |

**Upprunin til málið:**
Samskifti við Giza Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík hevur higartil havt felagshús við niðara vøll í Gundadali. Ynski er at flyta felags virksemi til nýggja fótbóltsvøllin í Hoyvík – Hoyvíksvøll.

Giza Hoyvík hevur higartil havt felagshús í Gundadalsvegi 8 (t.e. fyrrverandi Fram-húsið), ið er sambygt við Miðstovnin og Bragdahúsið. Felagið ynskir at virksemi felagsins framyvir skal vera í Hoyvík og at fáa hóskandi hentleikar við Hoyvíksvøll.

Samstundis ynskir felagið at TK yvirtekur ognina á Gundadalsvegi. Talan er um hús bygt at kommunala grund (matr. 1268a).

Giza Hoyvík hevur kannað møguleikarnar at fáa felagshús við Hoyvíksvøll og hevur fingið eitt tilboð uppá eina undanframleidda bygningsloysn, ið skjótt kunnu setast upp. Í máli 17/02157 Umstøður kring Hoyvíksvøll - er í heildarætlanini lagt upp fyri at Giza kann seta upp felagshús í sunnara horni av vallarøkinum. Tað er lutfalsliga høgligt at fara undir arbeiðið har.

Giza Hoyvík ynskir at kommunan yvirtekur bygningin á Gundadalsvegi 8 móti ávísum endurgjaldi. Økið har húsið stendur er partur av verkætlanarstigi 8 fyri Tórsvøll, har heildarætlanin fyri økið leggur upp til umskipan av økinum til fríøkið, parkering o.a. (sí hjálagt heildarætlanina fyri økið!)

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í seinni umfari kann leiðreglan um stuðul til íløgur vera viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Húsaumsitingin verður partur av málinum til at meta um virðið á ognini á Gundadalsvegi 8.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/02157 Umstøður kring Hoyvíksvøll.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki.

**Skjøl**
Leigusáttmáli (leita verður eftir honum)
Heildarætlan fyri Gundadal

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálnevndini til at samtykkja fylgjandi:

1). At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Giza Hoyvík um at yvirtaka ognina á Gundadalsvegi 8 og leggja úrslitið aftur fyri nevnd
2). At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Giza Hoyvík um at gera leigusáttmála við Giza Hoyvík um økið til at staðseta felagshús við Hoyvíksvøll

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við Giza Hoyvík um málið. Endaligt endurgjald fyri ognina var ikki ásett, men umrøddur ein umleið fermetraprísir samsvarandi metingini í hjáløgdu meting frá 2011, t.v.s. umleið 930.000 kr. t.e. ein m2 prísur á umleið 5.900 kr.

Keypið vil vera treytað av, at felagið brúkar peningin til at gera íløgu í undanframleidda bygningsloysn til felagshús v.m. við Hoyvíksvøll. Mettur kostnaður fyri tað er umleið 2.000.000 kr. Hugsanin er at geva felagnum eina treytaða tilsøgn um keyp, ið treytar, at felagið fær restupphæddina til vega til at bíleggja bygningsloysnina. Felagið kann her serliga søkja um pening frá FSF/Hattrick, umframt møguliga eginfígging. Samstundis verður tilsøgn givin til Giza Hoyvík um at kunna leiga nærri tilskilað økið við Hoyvíksvøll at staðseta bygningin. Mest sannlíkt vil tað ganga nakað av tíð áðrenn hesi viðurskifti eru endaliga greidd.

Fyri kappingarárið 2018 er ætlanin at flyta verandi skúr hjá felagnum (sum stendur í økinum) á niðaru helvt á eystursíðuni. Ítróttaanlegg fær gjørt tað soleiðis, at tilber at festa skúrin. Samstundis er ætlanin, at Ítróttaanlegg fær til vega ein skúr afturat til skifting, uppihald o.a., umframt ein WC-vogn til vallarøkið. Við hesum vilja tað vera toluligar umstøður fyri kappingarárið 2018. Hvat viðvíkur 1. deildarliðnum hjá Giza Hoyvík, so er ætlanin at tað kann skifta í Skúlanum við Løgmannabreyt ella í øðrum lagi spæla í Gundadali.

Í fíggjarætlanin á grein 5 er eingin játtan til keyp av ognini í Gundadali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera treytaða keypsavtalu við Giza Hoyvík um ognina á Gundadalsvegi 8, og at fígging verður fingin til vega til endamálið.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at fíggingin verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiði og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Ognin á Gundadalsvegi 8 er í sera ringum standi og heldur er støðan vorðin verri síðani metingina 2011. Leigusáttmálin millum táverandi fótbótsfelagið Fram og kommununa er nú funnin (sí hjálagt skjal!). TK hevur biðið Giza um at greiða frá, hvussu felagið kann roknast sum framhald av Fram og at hava yvirtikið ognina á Gundadalsvegnum 8. Felagið hevur latið eina nøktandi frágreiðing.

Ætlanin er at upphæddin, ið Giza Hoyvík fær fyri ognina verður oyramerkt til bygging av nýggjum felagshúsi við Hoyvíksvøll.

Umsitingin hevur júst verið í samráðingum við felagið, ið nú hevur broytt navn til FC Hoyvík um viðurskiftini. Felagið ynskir at avhenda húsini skjótast gjørligt og at felagið og TK fáa bygt eina loysn við undanframleiddum bygningseindum, ið kann vera fyrsta stig til eina størri ætlan. Sí hjálagt tekningar yvir hesa fyrstu loysnina. Metingin er at loysin kann fremjast fyri umleið 1.800 – 2.000 tkr. (við fyrivarni). Sí eisini hjálagt uppskot til langtíðar loysn til bygning, ið má metast at kosta eina størri mio. upphædd. Bygningurin er ca. 1200 m2.

FC Hoyvík er eisini í dialogi við FSF um stuðul frá sonevnda Hattrick grunninum hjá UEFA. Sostatt vildi ein fíggingarleistur verið samansettur av:
1. Endurgjaldi frá TK fyri ognina á Gundadalsvegi 8
2. Stuðul frá FSF/UEFA
3. Møgulig restfígging sum felagið savnar inn og stuðul til íløgur konta 5370 frá TK.

Peningur er ikki tøkur í verandi støðu til pkt. 1 og ivasamt er um konta 5370 rúmar fleiri umsóknum í ár.

Um farið verður víðari við ávegis loysnini kann arbeiðið væntandi setast í gongd í fyrru helvt av 2019 og bygningurin vera tikin í brúk í 2019. Neyðugt er við neyvari ráðlegging, myndugleikagóðkenning, umframt endalig fígging.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ætlanini og heimilað umsitingini til at gera liðugt uppskot at leggja aftur fyri nevnd, harundir útvegan av fígging.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við FC Hoyvík um hølisloysnir. Kannað hevur m.a. verið viðv. fyribils bingjuloysnum. Eyðkenni fyri allar loysnirnar er at tær krevja ávísa fígging, ið ikki er tøk sum er til hetta kappingarárið. Herundir er eisini málið um møguligt endurgjald fyri bygningin hjá felangum í Gundadali. Tað verður ætlandi tikið upp í sambandi við fíggjarætlan fyri 2020 ella 21.

Tí verður mett mest hóskandi at Ítróttaanlegg finnur onkra meiri einfalda bingjuloysn eini 2-3 ár fram, ið fyribils kann vera karmur um felagsvirksemi. Henda verður ogn hjá Ítróttaanleggum og verður so gjørd brúksavtala við FC Hoyvík, umframt møguliga eisini Undrið FF. Sí mál 18/03857. Ætlaða bingjuloysnin nøktar ikki allar tørvirnar, men gevur betri viðurskifti kring vøllin og kann so stigvíst gerast betri.

Mett verður at ein fyribils loysn kann gerast fyri eini 250 tkr. og verður fíggjað innan raksturin av Ítróttaanleggum í 2019 og 20. Ítróttanlegg hevur meirnýtslu frá 2018 og er løgd ein ætlan fyri at fáa hallið endaliga burtur í 2020 og ber ætlanin at henda verkætlanin verður framd.

Arbeiðið við at gera kloakk og seta upp WC-vogn er um at vera liðugt og verður klárt at taka í nýtslu í mai 2019.

Hvat viðv. hesum uppskoti er sannlíkt at FSF má vera lagaligt viðv. ávísum treytum í sambandi við umstøðurnar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera verkætlan við fyribils bingjuloysn til at lata feløgini við Hoyvíksvøll brúka í 2019 og 20.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
**Umstøðurnar kring vøllin**
TK hevur fingið áheitan frá FC Hoyvík viðv. trygdarviðurskiftunum kring vøllin og hevur verið á ástaðarfundi um viðurskiftini.

Fyri at fáa nakað betri skipaði viðurskifti kring vøllin verður mett hóskandi at gera fylgjandi átøk í summar.

1. Gera eina trappu frá Skúlanum við Løgmannabreyt oman til vøllin og soleiðis fáa eina trygga farleið frá skúlanum og parkeringsøkinum. Tilboð fyriliggur á 86 tkr.

2. Asfaltera økið eystanfyri – sunnara hálvu. Mett til 100 tkr.

3. Gera fyribils loysn við bingjum eins og lýst á fundinum seinast mett til 250 – 300 tkr.

Samanlagt umleið 450-500 tkr.

**Fígging**
Á kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. ber til at raðfesta 400 tkr. til endamálið og at hesar verða flutt til kontu 5717 Ítróttaanlegg, ið síðani fíggjar munin av síni rakstrarjáttan.

Konta 5310 Mentanartiltøk er málsræði hjá fíggjarnevndini, meðan konta 5717 er málsræði hjá mentamálanevndini. Møgulig umraðfesting skal sambært játtanarreglunum samtykkjast av mentamálanevndini og fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentmálanevndini til at samtykkja:
a). At farið verður undir ábøturnar sum nevndar omanfyri, treytað av fígging sbrt. pkt. B.
b). At heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at flyta 400 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til kontu 5717 Ítróttaanlegg.
c). At loysnin við bingjum skal samskipast av Ítróttanleggum og brúkast til tørvin hjá báðum fótbóltsfeløgunum, ið hava virksemi á Hoyvíksvølli.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt 7. juni 2019.

Viðv. trappuni frá skúlanum oman til vallarøkið
Tilboð eru fingið til arbeiðið, men síðani hevur verið samskifti við Býarskipanardeildina, ið mælir til at fyrsta trappan verður gjørd nærri innkoyringini til parkeringsøkið. Mett verður at loysnin er nakað dýrari, men gevur betri funktión. Av tøku upphæddini verða 150 tkr. settar av til endamálið at útinna saman við Býarskipanardeildini.

2. Økið eystanfyri er um at vera liðugt asfalterað.

3. Fyribils bingjuloysnin er fyrireikað víðari, men vísir tað seg, at áður gjørd kostnaðarmeting hevur týðandi frávik í mun til innkomin tilboð. Lægsta tilboð var nærum 3 ferðir upphæddina, og kann verkætlanin tí ikki lata seg gera innan verandi karmar.

Vesi-vognur er nú komin á økið og viðvirkar til betri reinføri í økinum.

Ætlanin er at fara undir nærri greiningar, hvørjar aðrar loysnir kunnu gerast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja ikki at útinna ætlaðu fyribils bingjuloysnina, men at umsitingin kemur við nýggjum uppskoti til hølisloysn til feløgini við Hoyvíksvøll, umframt at loysnin við trappu frá parkeringsøkinum verður broytt.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Útsett.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2019:** Samtykt at umsitingin kemur við nýggjari hølisloysn og uppskot til trappuloysn.

**Ískoyti**
Viðv. trappu frá skúlanum oman til vallarøkið
Býarskipanardeildin hevur kannað málið víðari og mælir til at hjálagda ætlan verður framd. Sí hjáløgdu tekning!

Viðv. fyribils bingjuloysn
Givið avmarkaðu fíggjarligu fyritreytirnar í málinum er ætlanin enn at útvega eina brúkta bingju til at stuðla undir ávíst virksemi við vøllin, meðan at skifting hjá liði og dómara framvegis verður í skúlanum. Hetta inniber at feløgini við Hoyvíksvøll søkja um undantak frá FSF til at nýta Hoyvíksvøll sum leikvøll. Fyri at

lætta um hjá skúlanum av hesum økta virkseminum er ætlanin at Ítróttaanlegg bjóðar seg at gera reint í skiftirúmunum hvønn sunnudag í kappingarárinum so at skúlin kann koma í rein hølir mánamorgnar. Hetta verður ætlandi gjørt innan fyri verandi rakstrarkarm.

Girðing við suðurendan – trygd
Grannar í Jørundargøtu hava víst á avbjóðingar við at bóltar í hópatali koma sendandi oman av vøllin niður á tún og tekjur teirra, umframt sama vanda í mun til smærri børn, grillir v.m. Umsiting hevur kannað málið saman við ráðgeva og meta at frægasta loysn er at hækka hæddina á girðingini/hegninum við umleið 3 metrum.

Ein loysn framvið øllum suðurendanum er mett til uml. 500 tkr. Vegna fíggjarligu fyritreytirnar í rakstrinum hjá Ítróttaanleggum verður ikki mett realistiskt at gera tað í einum og verður tí mælt til at gera arbeiðið yvir 2020 og 2021 og byrja har tað er mest sannlíkt at bóltar fara uppum og fíggja tað av rakstrinum hjá Ítróttaanleggum, um ikki aðrir møguleikar eru.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
a). at gera trappuloysn sbrt. tekningini
b). gera fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll
c). gera girðing við suðurendan í tveimum stigum.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka undir við b og c í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til vøllin í Hoyvík í 2021 og 2022. Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík, t.e. játtan til at útvega fyribils felagsumstøður og aðrar batar á kringumstøður, umframt ætlaðar 10.000 tkr. til 2021 og 15.000 tkr. til 2022.

Hvat viðvíkur 2020 so verður víst til annað mál viðv. endurlokan av máli 16/00407 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík, har tað er ein fíggjartørvur á 180 tkr. Uppskotið er, at henda upphædd verður fíggjað av tøku løgujáttanini 5775 fyri 2020 ætlað til vøllin í Hoyvík. Tøka upphæddin í 2020 er tkr. 820.

Fyribils felagsumstøður
Ítróttaanlegg er í holt við at kanna møguleikar fyri at leiga fyribils loysn til 2020, 21 og møguligar partar av 2022. Settar vera av 339 tkr. til leigu í 2020, umframt aðrar útreiðslur fyri at betra um viðurskiftini við Hoyvíksvøll.

Trappur norðanfyri
Umframt longu avsettu upphæddina á 150 tkr. vera settar av 100 tkr. eyka til at fáa eina nøktandi loysn. Sí annars mál 17/02157 Umstøður kring Hoyvíksvøll. Ætlandi verður arbeiðið útint í 2020.

Girðing sunnanfyri
Best var um girðingin øll var gjørd í 2020 og verður tí mælt til at seta 250 tkr. av av hesi løgujáttan til endamálið saman við somu upphædd á kto. 5717 Ítróttaanlegg. Málið er at arbeiðið er útint í 2020.

Byggiskrá
Mett verður hóskandi komandi heyst at fara undir at gera eina byggiskrá til eina komandi bygging við Hoyvíksvøll. Til endamálið verða settar av 120 tkr. Ætlandi verður uppskot til byggiskrá tøkt seint í 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:

a). at heimila umsitingini at innganga leiguavtalu um fyribils felagsumstøður við Hoyvíksvøll, umframt

aðrar tilhoyrandi útreiðslur.
b). at játta 100 tkr. eyka til trappuloysn.
c). at játta 250 tkr. eyka til girðing sunnanfyri.
d). at játta 120 tkr til gerð av byggiskrá.
e). at flyta 1.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020**: Samtykt at taka undir við b, c, d og e í tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Viðvíkjandi a) ynskir nevndin at umsitingin kemur aftur í nevnd við nærri frágreiðing og uppskot til loysn.
**Ískoyti:**
FC Hoyvík lat 10. mars 2020 umsókn um stuðul til íløgur til fyribils felagshús hjá FC Hoyvík (sí hjálagt skjal). Áður umsóknin varð latin, hevði samskifti verið við kommununa um innrættingar og krøv annars, umframt stuðulsmøguleika.

Ítróttaanlegg hevur samsvarandi samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini 7. og 12. juni 2019 (Mál nr. 18/00009 og mál 18/ 03857) eisini kannað møguleikar fyri loysn, sum kommunan stendur fyri.

Umsókni hjá FC Hoyvík fevnir um felagshús í modulum, sum tilsamans er uppá 224 fermetrar. Umframt tvey umklæðingarrúm við brúsum, felagshøli íroknað køk, dómarahøli, almenn vesi íroknað til rørslutarnað, vaski- og turkirúm og bóltrúm/goymsla. Hølini lúka vanligu krøvini til kappingarfótbólt.

Samlaður kostnaður sambært umsóknini er kr. 3.322.000 (rundað) íroknað 25% mvg. Tá er roknað við, at kommunan planerar økið (hesin kostnaður er ógreiður). Skuldi kostnaðarmetingin ikki hildið, tekur felagið fyrivarni fyri, at søkt verður um størri upphædd, so at ein møguligur meirkostnaður kemur undir hesa umsókn.

Søkt verður sostatt um stuðul til alla verkætlanina, tvs. eingin eginfígging er. FSF letur ikki stuðul til fyribilsloysnir. Stuðulsskipanin við afturbering av mvg-útreiðslum úr landskassanum til m.a. ítróttafeløg er ikki galdandi í løtuni. Sambært kostnaðarmetingini eru mvg-útreiðslurnar 664.000 (rundað).

Upplýst er, at leveringstíð og liðug uppseting tekur uml. 8 vikur.

Sambært reglugerð um stuðul til íløgur § 3, stk. 3 er stuðulin í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum. Sbrt. § 5, stk. 1 kann býráðið víkja frá reglugerðini, um serligar umstøður tala fyri tí. Fordømi eru um stuðul hægri enn 30%, men stuðul til alla upphæddina er at meta sum týðandi frávik, ið kann hava prinsipiellar avleiðingar viðvíkjandi øðrum ætlanum hjá ítróttafeløgum og øðrum feløgum um felagshús.

Felagið hevur søkt um byggiloyvið, sum byggideildin viðgerð í løtuni.

**Onnur mál av týdningi fyri málið**

Ognin í Gundadali
Felagið eigur ogn í Gundadali (gamla Fram-húsið) á leigaðum lendi frá kommununi. Ognin er í ringum standi og verður ikki brúkt. Sambært Tórsvallarætlanini skal ognin takast niður eins og hinar barakkirnar har. Felagið hevur boðað frá, at tað vil ikki lata endurgjald fyri ognina ganga inn í fíggingina av fyribilsætlanini, men at tað kann gerast í sambandi við endaligu loysnina m.a. at hava betri møguleikar at fáa stuðul frá FSF.

Endaliga loysnin fevnir um áskoðaraskýli til í minsta lagi 300 áskoðarar og størri felagshøli, ið lúka øll krøv til kappingarfótbólt. Í uppskoti til skipan av Hoyvíksvølli er ætlanin at byggja skýlið á vestaru langsíðu eftir nøkulunda sama leisti sum skýlið inni í Vika á Argjum. Verður samanborið við byggingina á Argjum, so bygdi og fíggjaði kommunan byggingina, tó so, at Argja Bóltfelag við stuðli frá kommununi og FSF stóð fyri

verkætlanini at innrætta sjálvi felagshølini og fekk brúksrætt frá kommununi til hølini. Mett verður, at sama mannagongd lutvíst kann brúkast í Hoyvík.

Tað er eisini við hesum í huga, at tað í langtíðaríløguætlanini árini fram til 2022 verður roknað við 25 mió til slíka bygging, sum kommunan stendur fyri.

Ein avgjørd treyt fyri fullum stuðli má verða, at kommunan við stuðlinum samstundis yvirtekur ognina í Gundadali uttan annað gjald.

Aðrar fyribilsloysnir

Ítróttaanlegg hevur kannað aðrar bíligari fyribilsloysnir, sum kunnu nøkta neyðuga tørvin í nøkur ár, antin sum keyp ellasum leigumál. M.a. er eitt tilboð fingið uppá eina bingjuloysn fyri umleið 1,7 mio.kr. tils. tá íroknað ymsar fyrireikingar v.m. og kommunalt MVG ella møgulig sum langtíðarleiga (leasing) yvir 3 ár - uml. kr. 500.000 um árið. Talan er um eina loysn, ið er nakað einfaldari enn hin loysnin, men hevur somu hentleikar umframt tvey fleiri umklæðingarrúm. Loysnin er ikki løgd til byggimálsviðgerð, leveringstíðin er uml. 10 vikur.

Fyrimunur er, at kommunan tá eigur bygningin til aðra seinni nýtslu eitt nú til frælsu ítróttafeløgini á Tórsbreyt, tá skýlið við felagshølum í Hoyvík er bygt.

Hóast FC Hoyvík er høvuðsáhugaparturin í fyribilsloysnini, so kundi ein kommunal loysn eisini verið við til, at fótbóltsfelagið Undrið FF (sí mál 18/03857 á hesum sama fundi), sum eisini hevur heimavøll í Hoyvík, kann fáa innivist í felags avtalu millum feløgini og kommununa. Í fjør samtykti mentamálanevndin og fíggjarnevndin at ein fyribils bingjuloysn skuldi samskipast av Ítróttaanleggum og brúkast til tørvin hjá báðum fótbóltsfeløgunum, ið hava virksemi við Hoyvíksvøll.

Skipan av økinum (mál 20/00040)
Til tess skipa umstøðurnar við Hoyvíksvøll betur er tørvur á fleiri arbeiðum, sum eisini krevja fígging. Fígging kr. 400.000 varð játtað til ávís arbeiðir í fjør, meðan íløgujáttan kr. 1 mió í ár er hugsað til m.a. girðing og byggiskrá til skýlið við felagshølum, men er ikki endaliga samtykt. Í upplegginum til fígging av fyribilsloysnini er niðanfyri roknað við, at henda milliónin fer at fíggja part av kostnaðinum.

Leigusáttmáli um lendi
Stendur felagið fyri fyribilsloysnini, eigur formligur leigusáttmáli um lendið, bygningurin stendur á, at leggjast fyri fíggjarnevndina.

**Fígging**

Viðv. uppskotinum hjá FC Hoyvík
Um talan er um stuðul til íløgu, so er fíggjartørvurin sum omanfyri lýst uml. kr. 3,3 mió treytað av, at felagið ikki fær endurrindað mvg. Verður mvg-afturberingarskipanin sett í gildi aftur við afturvirkandi kraft, er fíggjartørvurin uml. kr. 2,66 mió.

Verður samtykt at veita felagnum fullan stuðul, eigur kommunan samstundis at yvirtaka ogn felagsins í Gundadali uttan annað gjald. Umsitingin kemur á fundinum at greiða frá metingum viðv. virðinum á ognini í Gundadali.

Viðv. uppskotinum frá Ítróttaanleggum
Vildi verið talan um eina íløgu á umleið 1,7 mio.kr. við kommunalum mvg ella leigumál sum krevur nærri samráðing. Loysnin er ikki send til byggimálsviðgerð enn og krevur eisini at verða boðin formliga út.

Umsitingin metir at fylgjandi kontur eru viðkomandi ísv. fígging av møguligari fyribils loysn við Hoyvíksvøll

- Konta 5370 stuðul til íløgur 2020.

Har eru 678.500 kr. tøkar. Aðrar umsóknir eru um stuðul m.a. frá Skíðfelagnum Fjalir og Byrsumúla. –

- Løgukarmur 5775 Hoyvíksvøllur 2020
Har eru 1.000.000 kr.tøkar, tó um avgjørt verður at halda fast við samtykt viðv. girðing suðureftir er talan um umleið 800 tkr.

- Konta 5365 stuðul til ítrótt (framflutt frá 2019)
Har vera umleið 172 tkr. tøkar.

- Konta 7312 vinnutiltøk
Upplýst er fyrisitingini, at møguligt er at framflyta 700 tkr. til hetta endamálið.

Samlað røkkur hetta til uppskotið frá Ítróttaanleggum og til aðrar betringar kring Hoyíksvøll.

Um samtykt verður at játta fullan stuðul til ætlanina hjá FC Hoyvík 3,3 mió , er tørvur á umleið 1 mio.kr. afturat. Henda upphædd kundi verið játtað av játtanini til ljósskipan til Tórsbreyt - - Løgukarmur 5775 Tórsbreyt 2020. Tann verkætlanin er ikki farin í gongd enn.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja antin:

a). um farast skal fara víðari í samráðingar við FC Hoyvík um loysn til felagið sbrt. umsókini og herundir gera uppskot til leigusáttmála um lendi og yvirtøku av ogn felagsins í Gundadali

ella

b). at umsitingin fyrireikar víðari og bjóðar út eina loysn, ið Ítróttaanlegg mælir til og koma aftur í nevnd við ítøkiligum tilmæli til loysn og fígging.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at játta í alt kr. 2.072.000 í stuðli soleiðis:
- kr. 800.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg ætlað Hoyvíksvølli
- kr. 172.000 av kontu 5365 stuðul til ítrótt,
- kr. 700.000 av kontu 7312 Vinnutiltøk og
- kr. 400.000 av kontu 5370 stuðul til íløgur.

Treyt fyri stuðlinum er:
- at Undrið FF fær avtalaðan nýtslurætt til hølini
- at ognin hjá FC Hoyvík í Gundadali verður avhendað kommununi sum eginfígging til verkætlanina, sum stuðul verður játtaður til
- at leigusáttmálin um lendi til ognina í Gundadali verður uppsagdur
- at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur við FC Hoyvík um lendi til fyribilshølini við Hoyvíksvøll.

Harumframt verða játtaðar kr. 200.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg ætlað Hoyvíksvølli til at gera hægri girðing á sunnaraenda at flyta á kontu 5717 Ítróttaranlegg.

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at samlaði stuðulin til felagshølini verður kr. 2.400.500, ið verður fíggjaður soleiðis:
- Kr. 800.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg ætlað Hoyvíksvølli
- Kr. 172.000 av kontu 5365 stuðul til ítrótt
- Kr. 750.000 av kontu 7312
- Kr. 678.500 av kontu 5370 stuðul til íløgur

Harumframt samtykt at taka undir við mentamálanevndini um treytirnar fyri stuðlinum við teirri broyting, at viðvíkjandi nýtslurætti hjá Undrið FF til felagshølini verður hetta móti gjaldi til FC Hoyvík.

Eisini samtykt at taka undir við mentamálanevndini um at játta kr. 200.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg ætlað Hoyvíksvølli at gera hægri girðing á sunnara enda at flyta á kontu 5717 Ítróttaanlegg.

Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

# 98/20 Undrið FF : Virksemi og hølisviðurskifti felagsins í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 8/19 | 18/03857-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 149/19 | 18/03857-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 195/19 | 18/03857-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 160/19 | 18/03857-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 137/20 | 18/03857-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 121/20 | 18/03857-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 172/20 | 18/03857-2 |
| 8 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 98/20 | 18/03857-2 |
| 9 Býráðsfundur | | | 18/03857-2 |

**Upprunin til málið:**
Skriv frá fótbóltsfelagnum Undrinum FF til býráðslimir 25. oktober 2018.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Undrið FF ynskir møguleikar fyri sínum felagsvirksemi herundir skiftirúm og annað.

Sí hjálagt skriv frá Undrinum FF.

Felagið metir seg vera fyri vanbýti í mun til hini fótbóltsfeløgini í kommununi.

Tey eru:
HB – hava stórt egið felagshús í rímiligum standi. Hava lið í øllum ungdómsdeildum og vaksnamannadeildum.
B36 – hava stórt egið felagshús í rímiligum standi. Hava lið í øllum ungdómsdeildum og vaksnamannadeildum.
FC Hoyvik – hava lítið felagshús í ringum standa við niðara vøll í Gundadali, men eru í samráðingum um hølisloysn við Hoyvíksvøll. Hava lið í nógvum ungdómsdeildum og vaksnamannadeildum.
AB – hava egið felagshús á Argjum, umframt brúksrætt til felagshølir í kommunala skýlinum við vøllin í Vika. Hava lið í at kalla øllum ungdómsdeildum og vaksnamannadeildum.
Hesi eru limir í FSF, harumframt er felagið Trón, ið er eitt heilsufótbóltsfelag fyri kvinnur í høvuðsheitum.

Undrið FF hevur vaksnamannalið, umframt U21 lið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skipan av Gundadali 18/03453
Fótbóltsfelagið Giza Hoyvík: Felagshús við Hoyvíksvøll mál 18/00009
Argja Bóltfelag: Umsókn um stuðul til felagshús á Argjum mál 14/02134

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við nærri tilmæli til ein komandi fundi.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Undrið FF ynskir at hava heimstað í Hoyvík. M.a. vegna at týðandi partur av limunum er frá Hoyvík. Í Gundadali eru 3 vallir. Har virka 2 fótbóltsfeløg við umleið 1200 limum, umframt landsliðsvirksemi hjá FSF og fótbóltsflokkavirksemi og annað skúlavirksemi og frítíðarskúlavirksemi.
Í løtuni brúkar Undrið FF í ávísan mun skiftirúmini í Skúlanum við løgmannabreyt (eins og FC Hoyvík eisini ger). Hetta ber til í ávísum førum serliga summarhálvárið tá virksemi í hallunum er nakað minni, men elvir sum heild til avbjóðingar annars.

FC Hoyvík eru ónøgd við at Undrið FF skal hava heimstað og virksemi við Hoyvíksvøll og ynskir at felagið komandi ár aftur flytur virksemi oman í Gundadal. Sí hjálagt skriv frá FC Hoyvík.

Ítróttaanlegg og umsitingin metir kravið frá FC Hoyvík ikki er rímiligt tí, at virksemi hjá HB og B36, er fleirfalt virksemi hjá FC Hoyvík og Undrinum FF, umframt virksemi hjá FSF. Harumframt ynskir Undrið FF at vera heimhoyrandi í Hoyvík. Sí eisini tilmæli í máli 18/04294 Vallarreglugerð fyri fótbóltsvallirnar.

Vísandi til mál 18/00009 FC Hoyvík verður mett at hóskandi er at satsa uppá eina fyribils loysn við Hoyvíksvøll eini 2-3 ár fram.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera verkætlan við fyribils bingjuloysn til at lata feløgini við Hoyvíksvøll brúka í 2019 og 20.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Útsett.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum sum samtykt í málið 194/19 j.nr. 18/00009 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Sí tekst og tilmæli í máli 18/00009 FC Hoyvík – á sama fundi.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Víst verður til samtykt í málið 18/00009.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Víst verður til samtykt í máli 18/00009.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

# 99/20 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 296/16 | 14/00218-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 33/17 | 14/00218-2 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 72/17 | 14/00218-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 113/17 | 14/00218-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 220/17 | 14/00218-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 231/17 | 14/00218-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 141/18 | 14/00218-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 196/18 | 14/00218-2 |
| 14 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 117/18 | 14/00218-2 |
| 15 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 248/18 | 14/00218-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 49/19 | 14/00218-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 74/19 | 14/00218-2 |
| 18 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 62/19 | 14/00218-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 321/19 | 14/00218-2 |
| 20 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 87/20 | 14/00218-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 80/20 | 14/00218-2 |
| 22 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 56/20 | 14/00218-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | | | 14/00218-2 |
| 24 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 99/20 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er

[1] Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá "ad hoc"- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini største avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið $m^2$:**
4. hædd 170 $m^2$ - av hesum: 14 $m^2$ skrivstovur - 40 $m^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 $m^2$ - av hesum: 49 $m^2$ skrivstovur (38 $m^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 $m^2$ bókagoymsla

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

2. hædd 466 $m^2$ - av hesum: 43 $m^2$ skrivstovur - 14 $m^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 $m^2$ - av hesum: 100 $m^2$ lesistova
0. hædd uml. 20 $m^2$.
Tils. 1.161 $m^2$ - av hesum: 106 $m^2$ skrivstovur - 69 $m^2$ bókagoymsla - 100 $m^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**

Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at

Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin kemur á fundinum at geva status viðv. umsóknini til mentamálaráðið vm.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Kunnað varð um status.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá umbygging av 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 eru 736.000 kr. hægri enn upprunaliga mett. Áðrenn arbeiði kann byrja, skal neyðug játtan vera tøk.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 736.000 kr. til umbyggingina á konto 6109 umsiting og røkt av bygningum. Fíggja av kontum við avlop í 2016. 200 tkr. Av 1311 Miðfyrisiting, 436 tkr. av 5310 Mentanartiltøk og 100 tkr. av Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Síðani samtyktina hjá mentamálanevndini 4. mai 2016 og umsóknina sbrt. § 15, stk. 3, ið var latin mentamálaráðnum í juni 2016, hevur umsitingin regluliga spurt um málið hjá Mentamálaráðnum (MMR) og eitt tíðarskeið í ár Løgmansskrivstovuna (málsøkið var í uml. 2 mánaðir har) eftir svari uppá umsóknina.

7. september 2017 kemur soljóðandi fráboðan frá MMR:

”Viðvíkjandi umvæling/umbygging av Býarbókaaavninum í Havn.

Til endamálið er sett av á løgujáttanini árini framyvir, soleiðis:

2018: 1.5 mió. kr.
2019: 3.5 mió kr.
2020: 3.5 mió kr.

Hetta er tað, ið arbeitt verður við, sum landsins partur av útreiðslunum.

Endaliga verður hetta ikki samtykt fyrr enn løgtingsfíggjarlógin fyri 2018 er samtykt."

Nærri greiningar vera annars ikki givnar.

Tað er at fegnast um at MMR kemur við slíkari tilsøgn, tó at henda upphædd er ikki er heilt í samsvar við tað upphædd søkt er um sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini. Umsóknin til MMR var á uml. 17,5. mio.kr. yvir 4 ár.

Byggiskráin fyri verkætlanin er enn í gerð og hevur lutvíst verið bíðað eftir at fáa betri greiði á, hvat fíggjarligt útgangsstøði verður fyri verkætlanina. Ætlandi verður byggiskráin liðug í november og klár til nevndarviðgerð tá.

Ein fyritreyt fyri verkætlanini er at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta úr bókasavnsbygninginum. Tann verkætlanini er í gongd og verður ætlandi liðug um fáar vikur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fráboðanina frá MMR við atliti til at umsitingin kemur við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka við tilsøgnini frá MMR, men samstundis taka upp samskiftið við MMR um møguliga játtan árini 2021 og frameftir, soleiðis at komið verður uppá fullu upphæddina søkt er um.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í 2016 varð samtykt ein heildarætlan fyri umbyggingina av býarbókasavninum. Í einum ískoyti frá 2017 er skrivað, at ein fyritreyt fyri ætlanini er, at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta út av 3. og 4. hædd á Káta Horninum. KT-deildin og Fíggjardeildin eru nú flutt úr hølunum, men fyrisitingin hevur brúk fyri at hava skrivstovur á 4. hædd.
Deils er ætlanin at siga upp leigumálið í Niels Finsens gøtu 31, sum er hølini, ið húsa umsitingini hjá Heilsu- og Umsorganarstænastuni, soleiðis at fyrisitingin kann flyta tættari uppat restini av fyrisitingini í kommununi. Hetta hevur við sær eina sparing í leiguútreiðslum uppá kr. 265.200 um árið.

Harumframt skal pláss gerast til ein stjóra aftuat í ráðhúsinum, og hetta merkir, at staðsetingar av fólki í pørtum av fyrisitingini mugu umskipast.

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at samtykja, at heildarætlanini fyri umbyggingina av Býarbókasavninum ikki fevnir um 4. hædd á Káta Horninum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti**:
Skriv er komið frá starvsfólkunum á Býarbókasavninum í sambandi við framtíðarætlanir fyri Býarbókasavnið (sí hjálagt).

Arbeiðið við at gera byggiskrá sum samtykt á býráðsfundi 12. september 2016.

Arbeiðið við byggiskránni hevur ligið stilt síðani á sumri 2017, men er júst tikið uppaftur og er væntandi at eitt uppskot verður klárt til viðgerð í nevndini seinni í juni 2018 og sum síðani kann latast starvsfólkunum o.ø. til hoyringar. Endaliga byggiskráin verður síðani ætlandi løgd fyri nevndir og býráð til viðgerðar í august. Játtanin til verkætlanina er umleið 1 mio.kr. í 2018, umframt tilsøgnin um stuðul frá mentamálaráðnum á 1,5 mio.kr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar, og at 4. hædd á Káta horninum skal vera partur av byggiskránni sum upprunaliga ætlað í heildarætlanini.

**Ískoyti**:
Uppskot til byggiskrá fyri verkætlanina er til endaliga hoyring hjá Býarbókasavninum og starvsfólkunum har - sí hjálagt uppskot.

Til fundin 11. september 2018 verður ætlandi endaliga byggiskráin latin til viðgerðar hjá nevndum og býráð.

Umsitingin gjøgnumgongur á fundinum høvuðspunktini í uppskotinum og týðandi spurningar sum støða skal takast til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin kunnað um byggiskránna.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Kunnað varð um byggiskránna.

**Ískoyti**
Umsitingin hevði 1. februar 2019 havt fund við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið um støðuna í málinum.

Útmeldingin og niðurstøðan frá stjórnarráðnum er fylgjandi:
- Talið 8 mio.kr í § 15, stk. 3 stuðli er áleið tað sum lagt verður upp til.
- Grundleggjandi bygningsrøkt og ábøtur á tað metir ráðið ikki kemur undir § 15, stk. 3.
- Ráðið tekur undir við at gjørd verður eitt nýggja stigvís ætlan, ið síðani aftur skal góðkennast av Landsbókasavninum og sendast Landsverki sum bygningsráðgeva hjá mentamálaráðnum til metingar.
- at ráðið metir (við støði í meting hjá Landsverki) at metingin um verkætlanina er óv lág.

Í samtyktu løgtingsfíggjarlógini fyri 2019 stendur “Eingin játtan er til endamálið í 2019, men 1,5 mió. kr. verða eftir ætlan játtaðar í 2020, 1,5 mió. kr. í 2021 og 3,5 mió. kr. í 2022.”

Á fundinum var spurt um hvørt játtanin sum var fyri 2018 á 1,5 mio.kr. kundi flytast til 2019 so gongd kann koma á nakrar umbyggingar v.m. Ráðið skuldi kannað málið og ísofall leggja tað fyri í eykafíggjarlógini á várið 2019.

Við hesum tykist verða rættiliga greitt hvørja støðu verandi landsstýrið hevur til málið. Tískil er helst ikki annað at gera enn at fara undir at tillaga verkætlanina soleiðis at hon kann fremjast stigvíst og innanfyri teir givnu fíggjarkarmarnar komandi árini. Umsitingin og Býarbókasavnið meta at ein stigvíst ætlan er tað mest ynskiliga, bæði soleiðis at bókasavnið kann vera ein virkin stovnur hesi árini, umframt at fíggjartørvurin kann vera sámuligur og lagdur yvir nøkur ár.

Til fundin 13. mars er ætlanin at hava eina lidna byggiskrá klára íroknað eina stigvíst ætlan fyri umbyggingini og umvælingunum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera nýggja tíðarætlan fyri gerð av byggiskrá og stigvísari ætlan. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Landsbókasavnið hevur fingið uppskot til byggiskrá til hoyringar (sí hjálagt uppskot). Uppskotið leggur upp til eina framhaldandi stigvísa umbygging og umvæling í einum 5 stigum.

Ein høvuðsavbjóðing í málinum er vandin fyri at málið melur í klingur. TK er í vanda fyri ikki at fáa gjørt sína ætlan lidna (tíansheldur fara undir projektering v.m.) fyrrenn TK hevur nøkulunda vissu fyri hvat landið vil stuðla við.

Nú er lagt upp til at gera eina ætlan stigvísa ætlan har TK søkir um fígging til hvørt einstakt stig, men við heildini í huga, so tað verður lættari fyri TK og UMMR at viðgera einstøku stigini og fyritreytirnar fyri tí.

Fyri at hetta skal vera praktist gjøgnumførligt - havandi í huga politiska viðgerð í kommununi, í UMMR og løgtinginum, er neyðugt at landið setur av ávísa upphæddir yvir t.d. 5 ár, ið landið í mesta lagi vil lata til verkætlanina og tryggja sær at játtanin hevur átekning, ið ger tað møguligt at flyta játtan tvørturum ár.

Uppleggið frá TK er at brúka uml. 1 mio.kr. netto til verkætlanina (670 tkr. eru tøkar á løgujáttan, umframt møguliga smærri upphædd frá Húsaumsitingini) í 2020 og síðani umleið 3 mio.kr. um árið frá 2021, tí vildi eitt uppskot verið, at landið setti av 1 mio.kr av í 2020 og síðani umleið 3 mio.kr. um árið hareftir upp til ávísa upphædd.

Møguligt útgjald frá landinum til verkætlanina vil so til hvørt byggistig verða treytað av, at Landsbókasavn, Landsverk og UMMR góðkenna byggistigið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:

- útgangsstøði fyri samráðingunum við Landsbókasavnið og Uttanríkis- og mentamálaráðið, er ein stigvíst ætlan fyri árini 2020-2024, har TK játtar umleið 3 mio.kr. um árið frá 2021-24 í løgujáttan og landið minst tilsvarandi.

- umsitingin fær gjørt endaliga byggiskrá, íroknað tíðarætlan til støðutakan í nevndum og býráð í 2020.

Mentamálanevndin 27. november 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Enn er ikki avklárað viðv. lógarásetta stuðlinum frá landinum í heildarætlanini fyri Býarbókasavnið, men hetta verður væntandi greitt fyri summarið og áðrenn løguætlanin fyri 2021 hjá Tórshavnar kommunu verður samtykt í nov. 2020.

Fyri at fáa stigvísa gongd á, verður mett hóskandi at fáa gjørt eina minni verkætlan á 2. hædd á Býarbókasavninum, har tað pt. er eitt øki, ið hevur verið óbrúkt í mong ár vegna upprunaliga soppatrupulleikar o.a. Húsaumsitingin metir, at hesi høli kunnu fáast í hóskandi stand aftur

fyri uml. 700 tkr. Ætlanin hjá Býarbókasavninum er at gera hølini til eina ungdómsdeild, ið serliga skal gera tað áhugavert fyri ungdómin at leita sær á gátt bæði fyri at læna viðkomandi bøkur og fyri at uppihalda sær. Hetta er eisini í tráð við galdandi mál og avriksavtalu hjá Býarbókasavninum. Á projektkonto 54001 Býarbókasavnið eru tøkar 908 tkr.
Skotið verður upp, at Húsaumsitingin fær heimild til at gera hóskandi avtalur um fakarbeiðstøkur (timbur, HVS, el v.m.) til at fáa hølini egnaði til ungdómsbókasavn og innan fyri ein kostnaðarkarm á 700 tkr. Arbeiðini verða boðin út sum undirhondsboð til minst 2 feløg. Projekteringin verður gjørd av Húsaumsitingini og uttanhýsis ráðgevum, sum umstøðurnar nú tilskila. Harumframt verður skotið upp, at Býarbókasavnið útvegar hóskandi innbúgv fyri 128 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at geva umsitingini heimild til at gera arbeiðstøkuavtalur um gerð av ungdómsdeild á Býarbókasavninum fyri upp til 700 tkr., umframt at útvega innbúgv fyri 128 tkr. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá einum samlaðum býráðið um, at arbeiðið skal bjóðast út millum fleiri enn tveir arbeiðstakarar, ið varð einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um málið soleiðis broytt, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini seinast var viðmerkt at tað á projektkonto 54001 Býarbókasavnið eru tøkar 908 tkr. Tað er ikki heilt røtt upphædd. Á projektkontuni eru 670 tkr., meðan 238 tkr. eru á framflutta løgukarminum L00002. Neyðugt er sbrt. játtanarskipanini at játta hesa upphædd á projektkontuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja at flyta 238 tkr. av framflutta løgukarminum L00002 til projektkontu L54001 Býarbókasavnið. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

## 100/20 Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 10.11.2014 | 27/14 | 14/00949-2 |
| 2 Økisnevndin | 03.11.2014 | 26/14 | 14/00949-2 |
| 3 Økisnevndin | 02.11.2015 | 21/15 | 14/00949-2 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 23.11.2015 | 17/15 | 14/00949-2 |
| 5 Økisnevndin | 11.01.2016 | 2/16 | 14/00949-2 |
| 6 Økisnevndin | 07.03.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 102/16 | 14/00949-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 145/16 | 14/00949-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 173/16 | 14/00949-2 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 11 Økisnevndin | 02.05.2016 | 9/16 | 14/00949-2 |
| 12 Kollafjarðarnevndin | 09.05.2016 | 10/16 | 14/00949-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 197/16 | 14/00949-2 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 31.05.2016 | 6/16 | 14/00949-2 |
| 15 Økisnevndin | 29.08.2016 | 14/16 | 14/00949-2 |
| 16 Nólsoyarnevndin | 30.08.2016 | 7/16 | 14/00949-2 |
| 17 Hvítanesnevndin | 05.09.2016 | 3/16 | 14/00949-2 |
| 18 Kollafjarðarnevndin | | | 14/00949-2 |
| 19 Hest/Koltursnevndin | 08.09.2016 | 8/16 | 14/00949-2 |
| 20 Kaldbaksnevndin | | | 14/00949-2 |
| 21 Økisnevndin | 16.01.2017 | 2/17 | 14/00949-2 |
| 22 Økisnevndin | 13.02.2017 | 8/17 | 14/00949-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 43/17 | 14/00949-2 |
| 24 Økisnevndin | 03.04.2017 | 9/17 | 14/00949-2 |
| 25 Økisnevndin | 15.05.2017 | 11/17 | 14/00949-2 |
| 26 Økisnevndin | 11.09.2017 | 17/17 | 14/00949-2 |
| 27 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 203/17 | 14/00949-2 |
| 28 Kollafjarðarnevndin | 16.10.2017 | 4/17 | 14/00949-2 |
| 29 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 213/17 | 14/00949-2 |
| 30 Økisnevndin | 06.11.2017 | 19/17 | 14/00949-2 |
| 31 Økisnevndin | 09.04.2018 | 5/18 | 14/00949-2 |
| 32 Økisnevndin | 04.11.2019 | 11/19 | 14/00949-2 |
| 33 Økisnevndin | 09.03.2020 | 4/20 | 14/00949-2 |
| 34 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 125/20 | 14/00949-2 |
| 35 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 100/20 | 14/00949-2 |

### Málslýsing:

Bygdahegn Kollafjørður (vetrarfriðing)

Tórshavnar kommuna er farin í gongd við arbeiðið, at fáa sett upp bygdahegn í øllum bygdunum í kommununi. Talan er um, at fáa seyðin út úr bygdunum so at tilber, at fríðka um bygdina og skapa betri trivna millum fólk. Arbeitt verður við hesi ætlan í Nólsoy og nú er planurin at byrja upp á Kollafjørð.

### Tilmæli:

Fyristingarstjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin tekur undir við at hetta arbeiðið byrjar nú og at nevndin saman við umsitingini tekur stig til at tosa við teir eigarar og Landsverk, sum varða av økinum rundan um Kollafjørð.

**Økisnevndin 03. november 2014:**

**Ein meiriluti:** Halla Samuelsen, Jákup Dam, Sigrún Mohr og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó við tí fyrivarni at tað ikki skal hava nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið um vetrarfriðing í Kollafirði fer í gongd nú.

**Økisnevndin 02. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 11. januar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tilgongdina, at vetrarfriða Kollafjørð er nú gjørd ein útrokning, sum vísir eitt estimat fyri hvat kommunan skal gjalda til hegning og avloysing av vetrarbiti fyri hagarnar á Signabø og Oyrareingir. Í samráð við bøndirnar er løgd ein linja fyri hvussu hegningin skal skipast. Síðani er roknað út hvussu nógv lendi bøndirnir missa í sambandi við vetrarbit.

| **Hegn.** | **metrar** | **Kr./m** | **íalt** |
|---|---|---|---|
| Signabøur | 1.780 | 150 | 267.000 |
| Oyrareingir | 3.740 | 150 | 561.000 |
| | | | |
| **Mist vetrarbit:** | **M$^2$** | **kr/m$^2$** | |
| **Signabøur** | | | |
| Velt | 57.697 | 4,80 | 276.946 |
| ikki velt | 25.149 | 0,70 | 17.604 |
| **Oyrareingir** | | | |
| Velt | 0 | 4,80 | 0 |
| ikki velt | 0 | 0,70 | 0 |
| Rulluportur | 1 | 70.000 | 70.000 |
| Annað | | | 50.000 |
| | | | 1.242.550 |

Í uppgerðini er brúkt 150,- fyri hegning pr. metur. Tvs. 35,- kr. fyri tilfarið og 115,- fyri hegningina pr. metur. Í hesi útrokning er ikki tikin støða til hvat viðlíkahald av hegninum í framtíðini kemur at kosta kommununi.

**Økisnevndin 07. mars 2016:** Samtykt at beina málið í fíggjarnevdina til ummælis.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostnað og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at umsitingin skal fáa til vega eina heildarætlan, ið lýsir kostna og leist, fyri vetrarfriðing av øllum bygdum í kommununi er ynskiligt, at fáa eina ábending frá kaldbaksnevndini um tørvin á vetrarfriðing í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Staðbundna nevndin hevur umrøtt uppskot frá umsitingini um vetrarhegn í Kaldbak. Avtalað varð, at hava ein fund við festararnar í Kaldbak um hegnlinju.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingir og Signabø er fylgjandi samlað uppgerð gjørd yvir hvat hetta umleið kemur at kostað kommununi:

| | | |
|---|---|---|
| Longd hegn: | 16.800 m. | 1.512.000 |
| Rulluportur: | 2. stk. | 300.000 |
| Avloysing vetrarbit | 168.700 m2 | 809.760 |
| Árligt viðlíkahald | | 100.800 |
| Tilsamans | | 2.621.760 |

Prísurin fyri hegn er settur til 50,-/m. til hegn, pelar o.a. og prísurin fyri uppsetan er settur til 40 kr./m. Rulluportur eru sett til 150.000,- pr. stk. við ísetan. Avloysing fyri vetrarbit er sett til 0,70 kr./m2 fyri ódyrkað og 4,80 kr./m2 fyri dyrkað lendi. Árligt viðlíkahald er sett til 6 kr. pr. metur og tá er avskrivingin sett til 30 ár.
Metingin er gjørd við støði í fylgjandi fyritreytum hjá umsitingini:

- Hegnføringin er ikki gjørd í samráð við eigarar og bøndir á staðnum
- Støða er ikki tikin til um verðandi hegn kann nýtast, har tað stendur frammanundan
- Kostnaður fyri rulluportur er mettur til 150.000 kr. við ísetan, undantikið á landsvegi
- Avloysing av vetrarbit er mett, men um tað eru ivamál, kann Matrikulstovan gera neyvar mátingar. Búnaðarstovuni tekur endaliga avgerð um avloysing av vetrarbiti á almennari festijørð, saman við festaranum
- Ymisk jarðarstykkir, sum kommunan og onnur hava keypt mugu kannast nærri um avloysing fyri vetrarbit er goldin.
- Árliga viðlíkahaldið er sett til 6,-. kr/metur

Út frá hesum fortreytum kann sigast, at samlaði kostnaðurin upp á 2,6 mill fyri vetrarfriðing av Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø kann blíva munandi lægri, um størri ella minni strekkir av hegni kunnu endurnýtast og um avloysingin av vetrarbitið ikki blívur so umfatandi sum mett er.

**Økisnevndin 02. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur at greiða frá heildarætlanini.

**Kollafjarðarnevndin 09. maj 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Útsett.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 31. maj 2016:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at fara undir eina heildarætlan at vetrarfriða alla kommununa og at peningur til arbeiðið verður játtaður í sambandi við fíggjarætlanina 2017.

**Økisnevndin 29. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 30. august 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 05. september 2016:** Kunnað varð um málið.

**Hest/Koltursnevndin 08. september 2016:** Kunnað varð um málið. Ynski frá staðbundnu nevndini í Hesti at arbeiða við vetrarfriðing í Hesti.

**Økisnevndin 16. januar 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Á síðu 5, fjórsíðsta reglubrotið í samgonguskjalinum frá 30. decembur 2016, stendur «vetrarfriðing verður framd, har ynski er um tað». Um hesin málsetningur skal náast er átroðkandi, at peningur verður settur av til verkætlanina. Hetta kann gerast við einari passandi upphædd um árið - í nøkur ár. Ein leyslig meting vísir, at talan er um 6 og 9 mio. fyri alla verkætlanina - alt eftir hvussu nógvar bygdir ynskja vetrarfriðing.

Fyri at fáa gongd á arbeiðið, har Kollafjørður er peikaður út sum mest átroðkandi, bæði fyri trivna og trygd, er tað sera umráðandi, at peningur verður settur av til verkætlanina soleiðis, at umsitingin kann fara undir arbeiðið at tosað víð teir bøndir og privat fólk, sum eiga lendið í Kollafirði, ið verða rakt av einari vetrarfriðing.

Um peningur verður játtaður og áhugi er í politiska valdinum til hesa verkætlan, so er eingin forðing fyri at fara undir, at fáa tær formellu avtalirnar upp á pláss og síðani at nýta ein part av summarinum og heystinum til at seta skjøtul á sjálva hegningina.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til hesa verkætlan og síðani, um meirluti er fyri tí, sendir málið víðari til fíggjarnevndina til støðutakan.

**Økisnevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at fara undir eina tilgongd at vertrarfriða økini í kommununi og at peningur verður settur av í eini langtíðaríløguætlan.

**Ískoyti:**
Alt bendir nú á, at peningur verður settur av til vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu. Alt eftir hvussu stór upphæddin verður, so er tað neyðugt, at økisnevndin tekur støðu til hvønn leist, umsitingin skal leggja fyri dagin, í hesum máli.

Talan hevur verið um, at umsitingin bjóðar umboðum fyri hagapartin Heimara Helvt í Nólsoy til fundar, fyri at fáa gjørda eina endaliga avtalu um vetrarfriðing av bygdini. Í Nólsoy. Næstan øll hegningin er liðug og manglar tí bert ísetan av tveimum rulluportrum.

Eisini er Kollafjørður nevnd, sum ein bygd har vetrarfriðing er alneyðug – bæði tá ið hugsað verður um trygd á vegunum og trivnaðinum í bygdini.

**Tilmæli:**
Økissamskiparin mælir til, at økisnevndin tekur støðu til ein raðfesting av bygdunum.

**Økisnevndin 03. apríl 2017:** Nevndin samtykti at gera eina raðfesting soleiðis at byrjað verður í Nólsoy og annars lýsa nærri hvussu viðlíkahald er skipað í øðrum kommunum.

**Ískoyti:**
Økissamskiparin kunnar um gongdina í málinum.

**Økisnevndin 15. mai 2017:** Kunnað varð um um málið og økissamskiparin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**

**Bygdahegn í Kollafirði**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur sett 1 mió. kr. av til vetrarfriðing av bygdunum í 2017. Umsitingin hevur á fundi við avvarðandi festarar og eigarar hava avtalað eina mannagongd og ætlan fyri uppsetan av bygdahegninum. Samráðst verður við avvarðandi bóndir og privatar eigarar um avtalur, um víddir, avloysing og gjøld fyri miss. Hetta er treytað av, at peningur verður játtaður til framhald.
Ætlanin er nú, at seta skjøtul á arbeiðið við at stiga frá norðara enda í bygdini og heim til skúlan. Talan er um uml. 3.500 m., og við einum eindarprísi upp á 100 kr. pr. m., sum tilboð er givið uppá, so er talan um 350 túsund krónur.

Tá ið peningurin er játtaður, verður biðið um tilboð frá trimum veitarum upp á arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 350.000 av konto 6210.

**Økisnevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 350.000 av konto 6210 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 16. oktober 2017:** Økissamskiparin kunnaði um at arbeiðið er byrjað.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við umboð frá Heimara Haga í Nólsoy fyri, at kunna tey um gongdina í málinum viðvíkjandi vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu. Eisini arbeiðir umsitingin við einum uppskoti til avatalu við Heimara Haga í Nólsoy um vetrarfriðing.

Økissamskiparin kunnar nevndina um uppskot til avtalu millum Heimara haga og kommununa.

**Økisnevndin 06. november 2017:** Samtykt at arbeitt verður víðari við málinum so vetrarfriðingin í Nólsoy kann avgreiðast.

**Økisnevndin 09. apríl 2018:** Kunnað varð um málið og arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við vetrarfriðing av bygdunum í Tórshavnar kommunu, so verður arbeitt við tveimum bygdum. Deils Nólsoy, har arbeiðið byrjaði heilt aftur í 2005 og so eisini Kollafjørður.
Støðan í Nólsoy er tann, at umsitingin hevur seinastu tvey árini verið í samráðingum við umboð fyri hagapartin Heimara Helvt og eru tær samráðingarnar nú komnar so langt, at bert nøkur formell viðurskifti skulu fáast upp á pláss, áðrenn sáttmálin kann leggjast fyri hagafundin og síðani eisini fíggjarnevndina í TK. Ætlanin er, at fáa tey formellu viðurskiftini upp á pláss í 2019 og síðani fáa útint tað arbeiðið ið manglar, í 2020.

Viðvíkjandi Kollafirði, so eru fleiri avtalur við bøndurnar komnar upp á pláss. Talan er um íalt seks ymsar avtalur, umframt Oyrareingir og Signabøur. Fimm av teimum seks avtalunum í Kollafirði eru um at verða komnar undir land, men enn manglar Todneshagin. Stórsti og mest umfatandi hagin er Sjóarhagi Niðaripartur og eru ávís viðurskifti har, sum ikki eru avgreidd enn. Nevnast kann, at eitt mál liggur í yvirbúnaðarstevnu og skal avgerð takast, um hvør skal halda hegnið fram við landsvegnum í Líðini. Í Kollafirði er ætlanin, at fáa allar avtalur upp á pláss og fáa hegnað liðugt í 2020.

**Økisnevndin 04. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avtalan um vetrarfriðing í Nólsoy við Heimara Haga er nú við at verða komin undir land, og vil umsitingin tí leggja eitt uppskot til avtalu millum Heimara Haga og Tórshavnar kommunu fyri økisnevndina til góðkenningar og síðani, at beina málið fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar.
Mettur kostnaður fyri at gera arbeiðið liðugt í Nólsoy, er uml. 265.000,- uttan mvg.

| | |
|---|---:|
| Ísetan av rørportrum 70.000,- x 2 | 140.000,- |
| Uppsetan av hegn um. 500 m x 150 kr./m | 75.000,- |
| Portur o.a | 50.000,- |
| Íalt | 265.000,- |

Í avtaluni skal Tórshavnar kommuna gjalda haganum kr. 10.000,- um árið, fyri leigu av lendinum ið liggur innan fyri vetrarhegnið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at økisnevndin góðkennir avtaluna og at avtalan verður løgd fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenningar. Kostnaðurin fyri liðugtgerðan av hegni og ísetan av rørportrum skal gjaldast av íløgukonto «vetrarfriðing» 6275 og árliga gjaldið á 10.000,- kr. skal gjaldast av rakstrarkonto 6210.

**Økisnevndin 09. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við økisnevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 101/20 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 17/19 | 17/02247-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 153/19 | 17/02247-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 242/19 | 17/02247-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 278/19 | 17/02247-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 250/19 | 17/02247-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 17/02247-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 21/20 | 17/02247-1 |
| 21 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 15/20 | 17/02247-1 |
| 22 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 98/20 | 17/02247-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 130/20 | 17/02247-1 |
| 24 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 101/20 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

Gøtan millum bý og hav
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

Fiskastykkið

*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.*
*Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum

frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum

fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.

3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.

4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.

8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**
Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**
Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**
17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at koma víðari við ringrásini/gøtuni kring Havnina og kunna byrja uppá strekkið Yviri við Strond, er neyðugt at fara í samráðingar við traðareigararnar (matrikuleigarar), umframt leigararnar av kommunalu stykkjunum.

Størsti partur av matriklunum Yviri við Strond er privatogn, tí verður viðmælt, at hvør einstaki eigari verður innkallaður til ein kunnandi fund við tí fyri eyga at finna eina loysn, ið báðir partar kunnu semjast um.

Væntast kann, at samráðingartíðin verður nakað drúgv. Væntast kann somuleiðis, at ikki allir matrikuleigarar eru eins jaligir fyri tankanum, um at fáa eina gøtu ígjøgnum teirra lendi, og kunnu tí spenna føtur fyri ætlanini ella krevja endurgjald fyri miss av lendi.

**Samandráttur av uppskotið frá SNA:**
Fyri jól lat umsitingin SNA uppgávuna at gera uppskot til staðseting av gøtuni frá Skansanum yvir til Boðanes, umframt staðsetingina skuldi uppskotið fevna um snið av gøtuni.

Uppskotið frá SNA fevnir um strekkið Yviri við Strond, og verður gøtan á hesum strekkinum kallað Strandargøtan. Gøtan strekkir seg góðar 2,5 km frá Skansanum og til Boðanes.

Uppskotið leggur dent á, at Strandargøtan leggur seg eftir landslagnum og er staðsett á markinum millum fjøruna og bøin. Hetta fyri at geva tí vitjandi møguleika at uppliva náttúruna, bøin, fjøruna og brúsandi havið.

Gøtan í sær sjálvum vísir á, at tað menniskjaliga er tilstaðar í økinum, millum land og hav. Hetta sæst aftur í støddarlutfallinum á gøtuni, har mát sum favnur, alin, føtur og tummar verða nýtt gjøgnum alla gøtuna. Hetta styrkir tankan um at gøtan er ein menniskjansskapur bulur, ið er skolaður uppá land, samstundis sum at gomlu máteindirnar verða varðveittar.

Tilfarsvalið verður rátt og einkult, sjálv gøtan kemur at liggja sum ein betong strukturur við eini stálrammu/veggi, men har verða økir, ið verða meir rúmlig og viðgjørd úr øðrum tilfari, so sum timbur, innstoyptir flísar í ymiskum litum og ljósi.

Ynski er, at gøtan minst møguligt er til ampa fyri lendið, tí kemur betongflísin at hava føtur, ið kunnu javnast eftir lendinum, haraftrat verða ljós innleggingar gjørdar, so gøtan verður upplýst.

Á strekkinum verður tann vitjandi kunnaður um áhugaverd støð á strekkinum, har tað er upp lagt at steðga á, og verða hesi steðgiplássini gjørd við bonkum til lívd, kagstøðum, brúgvum o.ø.
Dentur er lagdur á at uppliva skifti í landslagnum, sum at fara frá fjøru til hellu, vøkstur o.a. hetta sæst aftur í sjálvari gøtuni við at ymiskt tilfar verður nýtt sum bindiliður á gøtuni.

Sambandið oman til Strandargøtuna er raðfest við at leggja smáar gøtur úr løgasteinum ígjøgnum summar traðir.

**Fiskastykkið**
Ráðgevarafyritøkan EYA arbeiðir við fiskastykkinum, og í løtuni eru tey í samráðingum við Tjóðsavnið, har uppruna uppskotið verður tillagað. Meir kunning um verkætlanina Fiskastykkið kemur seinni.

**Átøk:**
Neyðugt er at fara í samráðingar við matrikuleigararnar fyri at finna eina loysn, ið hóvar øllum pørtum. Síðani skal Strandargøtan projekterast og setast í verk.

**Skjøl:**
- *Strandargøtan síður A3 print, journal nr. 17/02247-37*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at byrja samráðingar við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, fyri síðani at koma aftur í nevndina við einum ítøkiligum úrskurði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
<u>Skráseting av djóra og plantulívi:</u>
Umsitingin hevur havt fundir við Tjóðsavnið um verkætlanina, og eru komin ásamt um at gera eina skráseting av djóra- og plantulívi á økinum, har gøtan er ætlað. Skráseting av djóralívi verður í eitt ár, og plantuskrásetingin á vári og summari.
Við hesum kann metast um møgulig umhvørvisárin av gøtuni sum frálíður.
Báðar kanningarnar eru farnar í gongd og er avtalað við Tjóðsavnið, at hava ein støðufund í vetur um gongdina, og innkomin úrslit av skrásetingini.

<u>Gøtan kring Havnina:</u>
Umsitingin hevur á vári í 2019 verið í samráð við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, og greitt teimum frá ætlanunum, ið Tórshavnar kommuna hevur í økinum. Samráðingarnar hava

gingið væl og samanumtikið hevur undirtøkan verið positiv. Viðmerkingar av ymiskum slagi hava verið, og eru tær tiknar við í víðari viðgerðina av málinum.
Uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt uppskot til loysn av elementum, sum skulu byggjast framvið sjóvarmálanum sum gøta.

Royndarverkætlan:
Ætlanin er gera element at byggja gøtuna upp við. Loysnin við elementum ger tað, at lendisviðurskiftini í fjøruni verða órógvað sum minst. Tilfarið av elementunum verður ymiskt, alt eftir hvussu økið er.
Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eitt strekki við 3 ymiskum royndarelementum á matr.nr. 651l og 651b, so elementini kunnu roynast í ein vetur, og loysnin kann eftirmetast, áðrenn farið verður víðari.
Matr.nr. 651l og 651b, er ogn hjá Tórshavnar kommunu og verða nýtt til parkering. Royndarelementini verða lætt atkomilig, og koma ikki at órógva verandi virksemi á økinum.

Arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir at geva tilboð uppá royndarelementini, men mett verður, at royndarelementini kunnu framleiðast og monterast á staðnum fyri 0,6 mió. kr.

## Skjøl:
*17/02247-37 Strandargøtan síður A3 print*
*17-02247-76 K100_Betongelement_strandagøta*
*17-02247-76 gøta skitsa*
*17-02247-76 gøta perspektiv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta fyribils ætlanina við gøtuelementum í verk,
- at játta 0,6 mió. kr. av konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið,
- at heimila umsitingini at seta royndarverkætlanina í verk
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at arbeiðið ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 eru játtaðar 5.000. tkr á konto 6275 fríðkan av kommununi.
Royndarelement til gøtuna kring Havnina eru prosjekterað, boðin út og verða framleidd og sett upp í næstum. Fyrsta stig við rudding av Fiskastykkinum er liðugt, og skal næsta stig setast í verk. Næsta stig er skurður í lendi, umvæling av lagingunum og atkomuviðurskifti til Fiskastykkið, sum verða sett í verk í samstarvi við ráðgeva og Tjóðsavnið.

Liðugtprosjektering av konstruktiva partinum av útsýnispallinum á Bukkvald skal setast í verk, og arbeiðið hareftir bjóðast út.
**Bindingar í lendi**
Løgfrøðilig ráðgeving ísv lendiseigarar og leigarar verður tikið uppaftur í sambandi við framhald av gøtuni. Leigusáttmálin við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør er galdandi inntil 2029. Býarskipanardeildin hevur samskift við Radioamatørarnar um hetta, og er semja um, at virksemi hjá teimum eigur at verða flutt, tá ið Fiskastykkið og Gøtan kring Havnina verður tikin í nýtslu sum alment brúksøki. Ynskiligt er tí, at nýggj staðseting verður funnin, so teir kunnu byrja at fyrireika seg til at flyta av økinum skjótast til ber.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 2.500 tkr. til framhald av ætlanini um gøtuna kring Havnina, Fiskastykkið og Bukkvald av løgukarminum konto 6275, fríðkan av kommununi, á projektkonto L62032, Gøtan Kring Havnina, Fiskastykkið, og at geva býarskipanardeildini heimild at seta arbeiðið í verk.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:**
Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini 23. apríl 2020 varð uppskot til samband millum Sandagerði og Runding lagt fram. Uppskotið var kandidatuppgáva hjá nýútbúnum landslagsarkitekti.

Uppskotið er væl í tráð við ætlanina um ringin kring Havnina, men má tillagast ætlanina við H-Bygninginum hjá Landinum og ætlanina í Álakeri hjá Tórshavnar kommunu sí 19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram.

Rætt hevði verið, at fingið landlagsarkitektin at gjørt eitt uppskot uppá hetta sambandið dagført í mun til hesar ætlanirnar, og at greina bindingarnar sum eru uppat sambandinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild.

**Skjal:**
19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram
17/02247-3 Tórsstien_2017_0

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 100.000,- kr. av L62032, Gøtan Kring Havnina Fiskastykkið, til at gera tillagað skipanaruppskot til loysn av sambandinum í økinum, og at greina bindingarnar, sum eru uppat økinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 415 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 102/20 Ústykking á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 21/20 | 20/00097-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 19/20 | 20/00097-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 45/20 | 20/00097-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 24.02.2020 | 4/20 | 20/00097-1 |
| 5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 29.04.2020 | 6/20 | 20/00097-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 68/20 | 20/00097-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.04.2020 | 83/20 | 20/00097-1 |
| 8 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 30.04.2020 | 7/20 | 20/00097-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 107/20 | 20/00097-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | | | 20/00097-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 102/20 | 20/00097-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur 20.06.2019 samtykt raðfestingar fyri kommunalar útstykkingar, har økið á Velbastað er raðfest í 2019-2020, sí skjal 19/02316-1 kommunalar útstykkingar.
Út frá omanfyristandandi verður tískil mett, at umsitingin eigur at fara undir at kanna møguleikan at stykkja út á Velbastað (sí kortskjal: Øki at útstykkja_kortskjal, journal nr. 20/00097-3).

Í 2019 vóru 249 íbúgvar á Velbastað, umleið 86 húskir. Velbastaður hevur seinastu árini veri bygdin í Tórshavnar kommunu við største tilflytaratali. Nógvu útstykkingarnar á Velbastað hava hálað til sín barnafamiljur og er Velbastaður í dag ein barnarík bygd. Vanligur leistur er at leggja nýggjar býlingar tætt at verandi býlingum, soleiðis at, vegir, rør og streymur kunnu gagnnýtast. Hesin leistur er tó torførur at fylgja á Velbastað, tí lendið er bratt, velt lendi og fjós er millum teir eldru býlingarnar, og gamli bygdarvegurin er illa egnaður til meira ferðslu. Tað eru trý nýggj bústaðarøki á Velbastað; undir Borgarhálsi, Gerðisbreyt og á Stórheyggi. Mett verður at hesi øki eru hóskiliga gagnnýtt í mun til brattlendi og tøkum byggilendi. Nógvi bøurin og fjósini ger at tað illa ber til at vaksa um bygdina millum teir eldru býlingarnar. Í byggisamtyktini fyri Velbastað er eitt upplagt øki tí, økið eystanfyri vegin; Norðuri í Trøð, sum eisini er lagt út sum sethúsaøki. Húsini á Velbastað eru vanlig sethús, og ongin tvíhús, rað- ella ketuhús eru í bygdini. Tí sampakkar hetta væl við verandi bygdadám.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um matriklarnar 3a og 1a. Tilsaman áleið 8300 fermetrar. Her er lendið munandi slættari enn býlingurin omanfyri; Undir Borgarahálsi. Væl ber til at binda í vatn og kloakkleiðingarnar, ið liggja oman gjøgnum matrikul 3a.
Vegurin; Norðuri á Trø er ein lutfalsliga smalur vegur. Vert er tí at kanna um vegurin kann flytast, breiðkast, ella bústaðarvegur kann gerast, soleiðis at hann kann koma at ganga oman av svinginum Norðuri á Heyggi og ígjøgnum byggilendi ístaðin.
Skitsa er gjørd av økinum, har uppskot til bústaðarveg er teknað við. Væl ber til at stykkja eini 12 grundstykkir út, ið liggja ávikavist um 400 til 600 fermetrar (sí Kort journal nummar 20/00097-2).

Umsitingin metir, at lættasti máti at fáa til vega byggiøki á Velbastað er, at kommunan ognar sær lendið frá Føroya Jarðargrunni.
Tosað varð við Landsverk um málið. Landsverk tekur undir við at byggjast kann fram við vegnum, men kann vera at Landsverk seta treytir um frástøðu til vegin.
Um so er, verður møguliga neyðugt at kommunan yvirtekur vegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært byggisamtyktini fyri Velbastað er loyvt at byggja sethús við upp til tveimum íbúðum. Við serloyvi frá byggivaldinum, er loyvt at byggja tvíhús, rað- ella ketuhús.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kunnað varð um ætlan um útstykking á Velbastað á borgarafundi á Velbastað 06.11.2019. Festarin gjørdi vart við á fundinum, at hann fer at mótmæla ætlanini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kommunalar útstykkingar journal nr. 19/02316-1
Kort journal nummar 20/00097-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | x | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at umsitingin fær heimild til at fara í tilgongd at keypa matrikul 1a og 3a frá Búnaðarstovuni, at umsitingin ger uppskot til skipan av økinum, umframt uppskot til hvussu víðari skal farast fram og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

Málið beint í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 24. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur ikki undir við uppskotinum, men vil hava eina heildarætlan fyri báðar bygdirnar.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 29. apríl 2020:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. apríl 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 15. januar 2020.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at lurta eftir staðbundnu nevndini og at sleppa útstykkingarætlanini á staðnum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 30. apríl 2020:** Staðbundna nevndin heldur fast við samtyktini frá 24. februar 2020.

Eyðfinnur í Búðini var ikki við til hetta málið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at leggja ætlaðu útstykkingina út til almenna hoyring soleiðis, at kommunan fær eina ábending um áhuga, tørv og slag av bygging. Talan er um økið niðan fyri býlingin undir Borgarhálsi á Velbastað, ið sambært byggisamtyktini er lagt út til sethús í 2004 av táverandi Kirkjubøar kommunu.

Vísandi til samtyktina 15. januar 2020 verður umsitingini eisini heimilað at keypa part av matr. 50a, Velbastaður fyri at tryggja vegaatkomu til útstykkingina og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at lurta eftir staðbundnu nevndini og at sleppa útstykkingarætlanini á staðnum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

## 103/20 Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.02.2018 | 5/18 | 18/00173-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 31/18 | 18/00173-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 45/18 | 18/00173-1 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 44/18 | 18/00173-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 34/19 | 18/00173-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.07.2019 | 133/19 | 18/00173-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 67/20 | 18/00173-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 99/20 | 18/00173-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 131/20 | 18/00173-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 103/20 | 18/00173-1 |

**Upprunin til málið:**.
Landsverk hevur, í sambandi við at nýggjur landsvegur varð gjørdur úr Havn til Gomulurætt, heitt á Tórshavnar kommunu um at taka yvir aftur vegateinin, sum gongur um Sandá, frá traðunum til íbinding í landsvegin har (sí hjáløgdu tekning). Málið er eisini vorið aktuelt í sambandi marknaumskipan millum hagarnar, sum hava mark har.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tá landsvegur varð gjørdur av nýggjum úr Havn til Gomlurætt, vórðu nakrir vegateinar, sum komu at liggja uttan fyri henda nýggja vegin. Gamli vegurin úr Havn til Velbastaðar og Kirkjubøar er frá fyrst í átjandu øld.

Tá ein landsvegur verður avloystur av nýggjum landsvegi, fellur gamli vegurin aftur til fyrrverandi eigaran, um hesin vil tað, og eftir møguliga samráðing. Við tað at hesin vegurin var kommunalur, innan hann gjørdist landsvegur í 1964, kann hann tí fella aftur til kommununa. Tað eru nøkur viðurskifti ið tala fyri, at kommunan yvirtekur vegateinin, sum er lýstur á hjáløgdu tekning:

- fyrst og fremst er tað gamla brúgvin frá umleið 1925 og sum Villiam Tórsheim (keisarin nevndur) lagaði og sum tí hevur søguligt virði fyri kommununa. Ynskir kommunan at varðveita og møguliga endurskapa partar av brúnni, er tað av stórum týdningi at eigaraviðurskiftini eru greið.
- Vegurin har er samstundis vegatkoma til traðirnar niðan fyri Velbastaðvegin við Norðasta Horn, í vestara enda. Tí kann hesin vegurin frameftir trygga vegatkomu til partar av hesum øki í mun til møguliga framtíðar búseting her.
- Ein møgulig framtíðar gøtuskipan millum Havnina og Velbastað/Kirkjubø kann inndraga hendan vegateinin.

Tey viðurskifti sum møguliga tala ímóti at yvirtaka henda landsvegin eru:

- Nakað av fíggjarligum bindingum fylgja við, at kommunan yvirtekur vegastubban og gerst vegamyndugleiki. Serliga við at seta í stand, reka og viðlíkahalda gomlu grót-brúnna. Okkurt smávegis má roknast við asfaltering, tó ferðslan her er sera avmarkað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum

**Umhvørvisárin**
Brúgvin hevur siðsøguligt virði fyri kommununa, og hevur virðir sum bygningsverk, sum varði yvir handverk sum ikki er vanligt í dag.

**Skjøl:** Havnardalur kort j. nr. 18/00173-2

Brúgvin um Sandá gomul klipp j.nr. 18/00173-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | x | x | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingur mælir til, at umsitingin fær heimild til at gera neyðugar avtalur um at yvirtaka og staðfesta eigaraviðurskifti av vegi og brúgv.

**Tekniska nevnd 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heitir á umsitingina um at gera eina kostnaðarmeting av at seta brúnna í uppruna stand.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið prosjekttilfar og kostnaðarmeting uppá afturgerð av gomlu brúnni frá uttanhýsis ráðgeva. Kostnaðarmetingin frá uttanhýsis ráðgeva uppá handverkaraútreiðslur er áljóðandi 1.550.696 kr. u/mvg, men má arbeiðið bjóðast út, fyri at kenna kostnaðin nærri. Harafturat kemur ókent, ráðgeving, eftirlit, leiðsla o.s.fr.

**Eigaraviðurskifti:**
Samskifti hevur verið millum Landsverk, Umhvørvisstovuna og Tórshavnar kommunu um eigaraviðurskiftini. Brúgvin er samband millum markatalsbygd 38 Velbastaður og 55 Tórshavn. Brúgvin er partur av gamla landsvegnum, ið er frábýttur í litra í markatali 55, men liggur sum partur av matr nr 4a "Syðri Spakiseyður" í markatali 38.

Landsverk kannar saman við Umhvørvisstovuni hvussu marknaskipan kann gerast, og kunnar Tórshavnar kommunu, væntandi í næstum, tá tað málið er greiðari.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eigaraviðurskiftini eru nú komin upp á pláss. Útbjóðingartilfar er gjørt og arbeiðið er nú klárt at bjóða út.

Arbeiðið umfatar, at seta brúnna aftur í uppruna stand herundir:

- Taka burtur asfalt, betongplátu, autoverju og rekkverk
- Reinsa brúnna og reinsa/hampa moldskráar báðu megin brúnna
- Seta upp nýggjar gelendarar fram við brúnni, av tí gamla slagnum
- Umvæla múrverkið, serliga fugur og leggja nýtt asfalt á

Arbeiðið er mett at kosta kr. 1.65 mió. við 6,25% MVG.

Brúgvin verður 100 ára gomul í 2025 og ætlanin er at hon skal verða partur av gøtuskipanini í kommununi.

Útbjóðingartilfarið er j.nr. 18/00173-14

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin innheintar 2 undirhondsboð at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð boðið út sum undirhondsboð til J&K Petersen og Konsax.
Bert eitt tilboð kom inn 6. nov.2019.
J&K Petersen kr. 2.779.702,- u/mvg.

Metingin hjá ráðgevum varð 1,55 mió. kr.
Hendan upphæddin er langt omanfyri metingina, og verður ikki mett ráðiligt at fara undir hetta arbeiðið.0
Brúgvin er við endan av blindum vegi, so endamálið við at seta hana í stand er í høvuðsheitum av mentanarligum týdningi.
Tó má kannast, um loyvi fæst at gera rekkverkið sum tað gamla var, eftirsum gamla rekkverkið ikki fylgir dagsins krøvum í mun til trygd. Sí skjal *18-00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Skjøl:** *18/00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at taka av innkomna tilboðnum, vísandi til at tilboðið er nógv hægri enn kostnaðarmetingin. Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støða til, um farast skal undir bara at gera nýtt rekkverk um brúnna, so tað í størst møguligan mun er sum tað upprunaliga rekkverkið var.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at heimila umsitingini at tillaga tilboðið og/ella at finna eina bíligari loysn, til at skifta bilverjuna út við ein stoypijarns gelendara, og gera kanningar, um asfaltlag kann takast av, so brúgvin kemur aftur at líkjast uppruna útsjónd.
Málið verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina til støðutakan og útvegan av fígging.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt hvussu farast kann víðari fram í málinum.
Semja er um, at til ber ikki bara at taka autoverjuna burtur, og seta gelendara í staðin.
Omaná gomlu brúnni er stoypt ein armerað betongpláta, sum helst er stoypt fyri at javna last frá ferðslu javnt á brúnna, men er eisini ein breiðkan av brúnni, har gamli gelendarin var.
Mett er, at tað rættasta er at biðja arbeiðstakara við serligum hegni at umvæla slíkar laðingar, um at fara undir at umvæla brúnna uppá tímaløn.
Í fyrsta umfari verður mælt til at játta 500.000 kr. til endamálið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 250.000 kr. av konto 6275, L00001 løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan «gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali, endurskapan» og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina um at útvega írestandi 250.000 kr.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta írestandi peningin til umvælingararbeiðið av konto 1313.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð at játta kr. 250.000 av 6275, L00001 løgukarmur fyri árið og kr. 250.000 av konto 1313 til umvælingararbeiðið.

Málið beint víðari til aðru viðgerð í býráðnum.

## 104/20 Umsókn um grundøki til vardar bústaðir – Sambýli í Reynstúni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 214/18 | 18/03494-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 318/18 | 18/03494-5 |
| 3 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 65/18 | 18/03494-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 335/18 | 18/03494-5 |
| 5 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 280/18 | 18/03494-5 |
| 6 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 32/19 | 18/03494-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 86/19 | 18/03494-5 |
| 8 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 43/19 | 18/03494-5 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 96/19 | 18/03494-5 |
| 10 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 50/19 | 18/03494-5 |
| 11 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 63/19 | 18/03494-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 17/20 | 18/03494-5 |
| 13 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 43/20 | 18/03494-5 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 127/20 | 18/03494-5 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 104/20 | 18/03494-5 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almannaráðið sendi í mars mánað í fjør kommununi umbøn um grundøkir til vardar bústaðir í Tórshavn. Vísandi til bráðfeingis tørvin á nýggjum og tíðarhóskandi vardum bústøðum og bústovnum í Tórshavn, hevur landstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina raðfestingarætlan fyri at loysa bráðfeingis tørvin á bústøðum fram til 2022. Tørvur er á fýra grundøkjum í Tórshavn til nýtt barnaheim og trý sambýli, tískil er ynskiligt, at kommunan kann veita Almannaráðnum fýra grundøkir til endamálið í Tórshavn, íroknað Argir og Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin umrøddi spurningin um økir til barnaheim og sambýlir í tráð við býarplanleggingina, og vísti í hesum sambandi á nøkur økir í ávikavist Tórshavn, Hoyvík og á Argjum. Har ímillum varð víst á eitt øki við Reynstún/Glyvursveg á Argjum, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, sum í fyrsta umfari ikki varð ynskt til eina staðseting til eitt sambýli, sí kortskjalið *Økið á Argjum_Kort*. Almannaráðið hevur seinni víst økinum ans, har ynski er at staðseta eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Trý lógaruppskot vóru í desember mánað løgd fyri Tingið, sum fevna um bygging av nýggjum barnaheimi, bú- og umlættingarheimi til børn og ung við autismu og bygging av tveimum vardum bústøðum til fólk við menningartarni. Landsverk hevur tí latið evnað eina byggiskrá til eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, har tað verður víst til økið í Reynstúni á Argjum við tí í huga, at Tórshavnar kommuna skal samtykkja staðsetingina til endamálið, sí byggiskrá og fylgiskjøl.
Eitt sambýli hóskar væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Byggingin verður staðsett fyri endan av einum vegi við sethúsum, og kann byggingin tí skapa ein samanhang við verandi býling, samstundis sum byggingin kann skapa sítt egna nærumhvørvið. Heimið skal staðsetast á byggiøkið soleiðis, at hetta liggur skilabest í mun til atkomu og parkering.

Ástaðarfundur var hin 16. februar 2018, har kommunan saman við umboðum frá ymsu áhugabólkunum vísti á ymsu økini og møguleikarnar. Býarverkfrøðingurin var somuleiðis við á staðnum, har staðfest varð, at besta atkoman til økið er umvegis Reynstún.

Ferðslan til og frá heiminum verður væntandi tann sama sum á líknandi bústøðum, ið Almannaráðið hevur í dag. Húsfólk verða koyrd við mini-bussum, og starvsfólk hava persónbilar. Fyri ein vanligan gerandisdag er ferðlsan sum fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Húsfólk: | 3 fráferðir við bussi millum kl. 8.00-9.00<br>1 fráferð kl. 10.00<br>1 fráferð kl. 10.30<br>1 heimferð kl. 14.00<br>3 heimferðir ímillum kl. 15.00-16.00 |
| Starvsfólk: | 7 starvsfólk møta kl. 7.00<br>8 starvsfólk møta ímillum kl. 15.00-16.00<br>2 starvsfólk møta kl. 23.00<br>2 starvsfólk fara heim kl. 7.00<br>4 starvsfólk fara heim kl. 12.00<br>2 starvsfólk fara heim kl. 15.00<br>8 starvsfólk fara heim ímillum kl. 20-23 |

Í dag hava øll starvsfólkini ikki koyrikort, summi búgva í grannalagnum og ganga til arbeiðis, meðan onnur taka bussin. Væntast kann tískil við minni bilferðslu enn lýst omanfyri. Eingin føst vitjanartíð er, og vitjandi eru allar gerandisdagar og í vikuskiftinum, væntast skal við áleið einum bili um dagin. Í vikuskiftinum er ferðslan hjá húsfólkum áleið 1-2 túrar um dagin, meðan ferðslan hjá starvsfólkunum er hin sama, sum í gerandisdøgunum. Ruskinnsavnan og vørumóttøka er einaferð um vikuna.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið í Reynstúni, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

1. *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
2. *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
3. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús, 300 m$^2$ fyri tvíhús og 250 m$^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki.*
4. *Byggistig 0,3*
5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m$^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Í sambandi við at Tórshavnar býráð á fundi 26. apríl 2001 samtykti at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið millum Reynstún og dagstovnin frá at vera B3 vinnuøki til A1 sethúsaøki, varð mótmæli frá eigarafelagnum Havnardalur ABC sent kommununi.

Í mótmælisskrivinum, dagfest 30. mai 2001, verður víst á, at eitt sethúsaøki kemur at økja um virksemið í verandi býlingi, og undrast tey á, at kommunan ikki hevur aðrar ætlanir við einum so høgligum øki, umframt at økið ikki er partur av eini størri heildarætlan. Grundað á, at ongin ítøkilig ætlan er fyri einum atkomuvegi til økið, vilja undirritaðu greitt mótmæla, at tey á ongan hátt kunnu góðtaka, at vegurin Reynstún verður nýttur sum møguligur atkomuvegur til økið. Mótmælið fevnir somuleiðis um nýtslu av Reynstúni sum fyribils arbeiðsveg ella atkomuveg til økið, meðan bygging fer fram.

Í sambandi við bygging av sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki hevur eigarafelagið Havnardalur ABC aftur sent kommununi skriv, har víst verður til mótmælið frá 2001, umframt at tey gera vart við sína

ónøgd, at tey ikki eru kunnaði og hoyrd um eina slíka stóra byggiætlan, sum tey meta fer at broyta umhvørvið í økinum munandi, sí mótmælið.

Økið er seinni broytt til A3 í almennu byggisamtyktini, og loyvir ásetingin tí, at eitt nýtt sambýli verður bygt í økinum. Tórshavnar kommuna ynskir somuleiðis at rúma øllum borgarum, tí er góð grundgeving at sameina eitt sambýli í eitt bústaðarøki, sum er við til at skapa ein fjølbroyttan bý.

Umsitingin var saman við býarverkfrøðinginum á staðnum, har staðfest varð, at vegurin Reynstún er egnaður sum atkomuvegur. Víst varð somuleiðis á, at ongin vegatkoma skal vera frá Glyvursvegnum. Økið er byggiøki, sum sjálvsagt hevur eina økta ferðslu við sær, men grundað á virksemið lýst omanfyri, metir umsitingin ikki, at ferðsluviðurskiftini verða stórliga broytt. Einki er tí til hindurs fyri byggingini, tó skal vegatkoman góðkennast av teknisku nevnd. Harumframt verður mett, at eitt 17 ára gamalt mótmælisskriv er óviðkomandi í eini viðgerð, har fleiri broytingar eru farnar fram.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Umsókn um grundøkir til vardar íbúðir, journal nr. 17/00903

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Serstøk byggisamtykt skal gerast í sambandi við útstykkingina.

**Umhvørvisárin:**
Einki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**
Hevur ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum.

**Skjøl:**
*Økið á Argjum_Kort,* journal nr. 18/03494-9
*Byggiskrá_Sambýlið í Reynstúni*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 01_Sambandi millum eindirnar*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 02_Gentle teaching*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 03_Námsfrøðiliga arbeiðið á Eirargarði*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 05_Tíðarætlan*, journal nr. 18/03494-8
*Mótmæli*, journal nr. 18/03494-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Tórshavnar kommuna skal selja Almannaráðnum lendið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, og at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson mælir til at finna aðra staðseting.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska deild hevur viðgjørt málið við atliti til reinsiverki, leiðingum og atkomu til sambýlið.
Verkætlanin má taka atlit til at nýtt reinsiverk til ovara part av Reynstúni og Reynsgøtu skal staðsetast har (P-økið kann brúkast), umframt til hetta byggjaríið, hetta má takast við í skipanina av økinum. Ætlandi skal eisini fjarhitaleiðing leggjast gjøgnum økið, frá rundkoyringini niðan til hitamiðstøðina. Mett verður at hetta kann gerast uttan størri ávirkan á verkætlanina. Viðvíkjandi atkomuvegum verður mett, at ferðslutrýstið frá stovninum er so mikið lítið, at tað ikki er til stórvegis ampar fyri íbúgvarnar har. Hinvegin kann byggingin vera við til at betra um vendimøguleikarnar við endan á Reynstúni, og møguliga eisini geva nøkur P-pláss at nýta í sambandi við føðingardagar o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja Almannamálaráðnum lendi at byggja sambýli á fyri kr. 156/m².

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, treytað av at góð parkeringsviðurskifti verða.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Eon minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kunningarfundur var tann 7. januar 2019 hildin fyri grannunum í Reynstúni, har Almannaverkið og Tórshavnar kommuna høvdu eina framløgu, har fleiri sjónarmið viðvíkjandi bygging av nýggjum sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki vórðu løgd fram.

Greitt varð frá, hvussu byggingin er ætlað skipað í eindum við lítlum íbúðum (35 $m^2$ til støddar), arbeiðstíðir hjá starvsfólkum, og hvørjar dagligar fráferðir og vitjanir búfólk og vitjandi gera. Økisásetingarnar í almennu byggisamtyktini vórðu lýstar, umframt at greitt varð frá ferðslu- og generellu parkeringsviðuskiftunum í økinum. Um eitt sambýli verður gjørt fyri endan á vegnum, so er ætlanin, at vendiplássið verður gjørt nøktandi, og hugsast kann, at nøkur parkeringspláss verða tøk til eitt nú føðingardagar v.m.

Grannarnir førdu fram sína ónøgd í sambandi við, at atkoman til sambýlið skal vera umvegis Reynstún, og ynsktu at vita hví íbinding ikki kann gerast í Glyvursvegin. Sum áður nevnt, so ynskir kommunan ikki, at innkoyring er frá Glyvursvegnum, tí hesin vegurin verður helst høvuðsæðr við nógvari ferðslu út á Glyvursnes. Og tá Glyvursvegurin er ikki egnaður til íbinding, er eyðsætt, at Reynstún verður atkomuvegur, og er Reynstún somuleiðis mett, at vera nøktandi til økta virksemið í økinum. Kommunan vísti á, at møguliga kann arbeiðsvegur gerast inn frá Glyvursvegnum í byggitíðini, men skal hetta kannast nærmari í framhaldandi tilgongdini. Og ikki minst varð greitt frá um íbúgvarnar, sum skulu búgva í sambýlinum. Talan er um um brúkarar, ið eru illa fyri, og koma teir tí ikki at ávirka grannalagið nakað serligt.

Aðrar viðmerkingar frá grannunum vóru t.d., at myndirnar í framløguni vóru misvísandi, at grannar omanfyri á Reynsgøtu parkera í Reynstúni, og at fleiri bilar eru til hvørt húski, og tí er parkering á vegnum.

Síðani fundin hevur Almannamálaráðið sent kommununi skipanaruppskotið fyri ætlaðu bygginguna. Umsitingin metir tað ikki vera neyðugt við eini serstakari byggisamtykt fyri økið og nýbyggingina í Reynstúni, grundað á ásetingarnar fyri A3 øki, ið eitt nú ásetir at loyvt er at byggja stovnar á økinum. Tað er einans neyðugt við serstakari byggisamtykt, um talan er um eina útstykking, og um byggingin ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Umsitingin metur ikki, at ætlaða byggingin kann kallast ein útstykking, tá talan er um ein bygning/ein stovn. Av tí at eingin serstøk byggisamtykt verður gjørd, verður heldur eingin almenn hoyring av málinum. Mett verður tí, at grannarnir, grundað á teirra mótmælið eiga at verða kunnaðir um ætlaðu bygginguna. Kunningarfundur hesum viðvíkjandi verður eftir ætlan hildin í viku 20.

**Skipanaruppskotið**
Á heystið 2018 bjóðaði Landsverk ráðgeving av nýggjum sambýli út í kapping. MAP Arkitektar vunnu kappingina, sum varð avgjørd í desember 2018, og varð skipanaruppskotið latið kommununi síðst í mars mánaða í ár, sí Fylgiskjal 2 - skipanaruppskot.

Hugsjónin í uppskotinum er, at búfólkini sum hava skerdar virkis førleikar skulu varðveita sínar kropsligu, sálarligu og sosialu førleikar so leingi til ber. Nærveran og sambandi við onnur menniskju er kjarnin í námsfrøðiliga arbeiðinum í heiminum, og eru fysisku karmarnir inni og úti tí einfaldir og sansastimbrandi, lætt er at finna vegin fram og at fáa samband við onnur búfólk og starvsfólk. Á staðnum eru góðir møguleikar fyri at skapa sansastimbrandi upplivingar fyri búfólk og familjur teirra. Lagt verður tí upp til, at búfólkini uppliva staðið við at eygleiða, hoyra, lurta og nerta.

Byggingin er skipað í tríggjar eindir, harav tvær eru búeindir við 9 íbúðum í hvørjari og eini felagseind, sum fevnir um starvsfólkahøli, felagskøk, vaskarí, vesi til gestir og avvarðandi, tøknirúm og sansarúm. Hvør búeind er somuleiðis skipað við 3 býlingum, sum fevna um tríggjar íbúðir og eitt felags tún. Innrætting av túnum, val av tilfari og litum kann skipast við luttøku av búfólkunum, soleiðis at tey eru við til at seta sín dám á heimið.

Atkoma til sambýlið er frá Reynstúni, og parkeringspláss við áleið 26 p-básum vera á økinum, um roknað verður við 1 p-bási pr. 50 fermetrar. Møguleiki er at gera almenna gøtu frá buss steðgiplássinum við Glyvursvegin og niðan til sambýlið og Reynsgøtu. Gøtusambandið kann verða til gagns fyri grannalagið í Reynstúni, og verður verandi gøtusamband óbroytt. Umsitingin ger neyðugar tillagingar um neyðugt.

Umsitingin hevur ásannað, at ætlaðu parkeringsplássini upp at Reynstúni og vendiplássið, sum ynskiligt verður gjørt nøktandi ikki er við í ætlanini. Heitt er á Landsverk um møguleikan fyri at flyta runt upp á hetta í framhaldandi tilgongini.

**Skjøl:**
Fylgiskjal 2 Reynstún - Skipanaruppskot (útg. 2), journal nr. 18/03494-24

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Vísandi til at vendipláss og parkering skal verða við endan á Reynstúni verður málið útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 7. mai 2019.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur var við íbúgvarnar í Reynstúni mánadagin 13. mai 2019. Kjakið til fundin bleiv rættiliga heitt, og varð tí avgjørt at taka ein fund millum byggiharran og umsitingina fyri at umrøða støðuna.

Hesin fundurin varð hildin 22. mai 2019 og møttu Almannamálaráðið, Almannaverkið og Landsverk, umframt borgarstjórin og umboð fyri kommunalu umsitingina. Niðurstøðan á fundinum varð, at umboð frá byggiharranum skuldu koma á fund í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019 at leggja skipanaruppskotið fram, og skuldu allir býráðslimirnir somuleiðis bjóðast til hendan kunnandi fundin, soleiðis at spurningar ella ivamál til skipanaruppskotið kundu verða svarað beinleiðis av byggiharranum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðari á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Landsstýriskvinnan í Almannamálaráðnum, umboð fyri byggiharran og MAP arkitektar greiddu frá og svaraðu spurningum í sambandi við skipanaruppskotið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

Bjørg Dam atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at skipanin av økinum er broytt, eins og ráðgevi greiddi frá á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019. Sostatt eru 8 parkeringspláss við innkoyringina til vardu bústaðirnar, og restin innast á stykkinum, uml. 50 m frá innkoyringini. *Støðumynd_Parkering_500-01 18/03494-38 lýsir hetta.* Tá byggingin er liðug, verður øll parkeringin tøk hjá grannalagnum at brúka og kemur sostatt grannunum til góðar.

**Skjøl:**
*Støðumynd_Parkering_500-01 18/03494-38*

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, at arbeiðsvegur verður gjørdur frá Glyvursvegnum í byggitíðini og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigursson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Tá ið fíggjarnevndin 28. november 2018 viðgjørdi málið, tók meirilutin í nevndini bert støðu til tilmælið frá tekniska stjóra og býarverkfrøðinginum um at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Fíggjarnevndin tók sostatt ikki støðu til tilmælið frá kommunustjóranum og leiðaranum á stjórnarskrivstovuni um at selja lendi at byggja sambýli á fyri kr. 156/m².

Fyri at kunna avgreiða málið, er neyðugt at fíggjarnevndin og býráðið viðgera tilmælið í mun til sjálva søluna av lendinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum til fundin 28. november 2018 at selja Almannamálaráðnum økið í Reynstúni til sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki fyri kr. 156/m².

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við staðsetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

# 105/20 Træplanting 2019, løguætlan 6275

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 38/19 | 19/00558-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 84/19 | 19/00558-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 69/19 | 19/00558-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 95/20 | 19/00558-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 132/20 | 19/00558-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 105/20 | 19/00558-2 |

**Upprunin til málið:**
Skotið verður upp at fremja gróðurseting av 10.000 trøum og runnum á hesum økjum:

- Skúlin á Fløtum
- Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og í Hoyvík
- Myllutjørn/Dalurin Langi,
- Og øðrum økjum, so sum á Argjum og á Signabø

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ásannað verður at viðarvøkstir, trø og runnar skapa lívd, og gera fjølbroytni í umhvørvinum. Flottar summar- og vetrarmyndir, við vøkrum, vár- og heystarlitum, ið mynda gongdina í árinum. Frítíðar- og fríluftslívsumstøðurnar betrast, til spákingartúrar, rørsluítriv, ítkan og motión, upplivingar at merkja ymisleikan í veðrinum. Harumframt eisini møguleikar hjá fuglum at líva sær og reiðrast og fjølbroytni og margfeldni í floru og faunu. Í okkara grannalondum verður eisini ásannað, at viðarvøkstir gera mun at binda $CO_2$.

- 4000 stk. trø og runnar við nýggja Skúlan á Fløtum. Ætlanin er í samráð við verkætlanarbólkin av Skúlanum á Fløtum, skúlaumsitingina, børn og ung, og umhvørvisdeildina at seta plantingina á skrá nú í vár, soleiðis at trøini og runnarnir eru komin nakað fyri seg, tá skúlin letur upp á sumri 2020. Byggiverkætlanin fevnir um eina plantiætlan, og er partur av jørðarbeiðinum longu gjørt, soleiðis at tað er klárt at planta. Enn væntar tó neyv lýsing av, hvørji trø og runnar skulu plantast, umframt planleggingin av plantingini saman við umsitingini í skúlanum/skúlabørnunum. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 200.000 kr. og tá er partur av verkætlanini goldin av byggiverkætlanini.

- 4000 stk. trø og runnar við báðar kirkjugarðarnar, Velbastaðvegur og í nýggja kirkjugarðinum í Hoyvík. Ætlanin er at planta 2000 plantur í hvørjum av kirkjugørðunum, nú teir báðir verða lidnir. Plantingarætlan ikki endaliga staðfest, og skal hetta gerast, áðrenn plantingin kann setast í gongd, men er ætlanin at náa at seta plantingina í gongd í vár. Kostnaðarmeting fyri planting av 4000 trøum og runnum er áljóðandi 200.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjunum við Myllutjørn/Dalurin Langi. Ynskiligt er, at fríøkið við Karlamagnusarbreyt Myllutjørn og partar av Dalinum Langa verður gróðursett, soleiðis at økini verða hugalig og mennandi at uppihalda sær í. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 50.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjum annars t.d. Signabøur, Argir. Harafturat eru fleiri økir, ið ynskja meiri planting, og er ætlanin at raðfesta hesa plantingina í 2019. Kostnaðarmeting fyri planting av 1000 trøum og runnum er áljóðandi 50.000 kr.

Samlaður kostnaður fyri plantukeyp og gróðurseting er áljóðandi 500.000 kr. Sí viðheftu kortskjøl, sum lýsa ætlaðu plantingina.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotunum at raðfesta keyp og gróðurseting av plantum sambært omanfyri nevndu ætlan, og at játta 500.000 kr. av konto 6275, L00001 til planting í 2019 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Sum framhald av træplanting í kommununi er ætlanin, at træplanting verður á hesum økjum í 2020.**

- Argir við brúnna og rundkoyringina 1200 stk. trø og runnar til vegskráan eystureftir við nýggju brúnna út á Argir. Ætlanin er at planta 1200 trø og runnar í vár. Kostnaðarmeting áljóðandi 60.000 kr.
- Havnardalur, 2000 stk. trø og runnar á nýggja skógfriðaða økið í Havnardali. Kostnaðarmeting áljóðandi 100.000 kr.
- Myllutjørn, 1300 stk. trø og runnar í fríøkið við Myllutjørn. Kostnaðarmeting áljóðandi 65.000 kr.
- Djúpagil, 2700 trø og runnar í Djúpagili við tjørnina norðan- og sunnanfyri gl. vatnbrunnin. Kostnaðarmeting áljóðandi 135.000 kr.
- Karlamagnusarbreyt, 1800 stk. trø og runnar í størri og smærri økjum í við Karlamagnusarbreyt. Kostnaðarmeting áljóðandi 90.000 kr.
- Skúlin á Fløtum, 1000 trø og runnar við Skúlan á Fløtum, skúlin skipar fyri plantingini saman við næmingum.
  Kostnaðarmeting áljóðandi 50.000 kr.

**Skjøl:**
*Kort av træplanting 2020,* journal nr. 19/00558-10

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við uppskotinum til raðfesting av træplanting sambært omanfyri nevndu ætlan, og at játta 500.000 kr. av konto 6275, L00001 til planting í 2020 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020**: Einmælt samtykt.

## 106/20 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:
- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf.*

Árinskanningin vísti m.a. at:

- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.

| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 435 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin “skipan av Stórutjørn” er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 107/20 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 134/20 | 20/01635-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 107/20 | 20/01635-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Grannskoðanarprotokoll
Ársroknskapur 2019

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna ársroknskapin fyri 2019.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 108/20 Framflytingar fyri roknskaparárið 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 136/20 | 20/01383-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 108/20 | 20/01383-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært Játtanarreglunum hjá Tórshavnar Kommunu verður meir- og minninýtsla framflutt til komandi árið. Hesar framflytingar skulu játtast í Býráðnum sum eykajáttan.

Í sambandi við, at ársroknskapurin fyri 2019 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2020.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn, er fyri rakstur 37,0 mió.kr. netto og fyri íløgur 143,1 mió.kr. og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 21,6 mió.kr. | 97,5 mió.kr. |
| TH | 15,4 mió.kr. | 45,6 mió.kr. |

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjal nr. 20/01383-4

Framflytingin á **§1 Kommunal fyrisiting** er íalt 2,3 mió.kr. Mælt verður til at flyta 550 tkr. av hesari upphædd til Barnatannrøktina konto 2310 á §2. Eisini verður mælt til, at flyta 52 tkr. til 1315 Nevndir og ráð orsakað av at val verður til eldraráðið heysti 2020.

Á **§2 Almanna- og heilsumál** er ein samlað minninýtsla á 7,4 mió.kr., sum verður framflutt. Heilsu- og umsorganartænastan mælir til at flyta 3,1 mió millum kontur á teirra øki. Á Trivnaðarøkinum verða 100 tkr. fluttar millum kontur.

**§3 Børn og ung** hevur eina samlaða meirnýtslu á 8,2 mió.kr. í 2019. Mælt verður til at nullstilla framflytingina fyri allar kontur, undantikið konto 3213 Systkinaavsláttur, ið hevur eina meirnýtslu á 3,1 mió.kr. Munurin upp á 5,1 mió.kr. verður fíggjaður við 2,3 mió.kr. í meirinntøkum fyri 2019 og 2,8 mió.kr. á konto 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing í 2020. Eisini verður mælt til, at dagstovnar, sum hava minninýtslu í 2019, fáa 50% av minninýtsluni framflutta. Talan er um 1,3 mió.kr., sum verður fíggjað av konto 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing í 2020.

Framflytingin á **§4 Undirvísing** er 328 tkr. 100 tkr. av hesum verða fluttar á 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur, sum hevur meirnýtslu í 2019. Kommunurnar gjalda 20% av rakstrarstuðli til lærlingaundirvísing.

**§5 Mentan og frítíð** hevur eina minninýtslu á 837 tkr., sum verður framflutt. Av hesum verða 250 tkr. fluttar til §6 L62038 Standmynd/minnismerki um Andreu Árting.

Samlaða framflytingin á **§6 Teknisk mál** er 2,7 mió.kr. Nakrar kontur á §6 hava meirnýtslu og verður mælt til at flyta 7 mió.kr. av ymiskum rakstrarkontum til tær deildirnar, sum hava meirnýtslu. Millum annað 3,9 mió.kr. til 6110 Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað og 3,5 mió.kr. til 8110-8114 Vegir o.a.

**§7 Kommunal virki** hevur eitt avlop á 14,7 mió.kr. í 2019. Av hesari upphæddini eigur 7110 Renovatión 6,8 mió.kr. Mælt verður til at flyta 2 mió.kr. av §7 til §6 og at flyta íalt 500 tkr. til 7210 Brandstøðina og 7210 Bussleiðina.

| | Býráðsfundur<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 441 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til, at játta framflyting á 37,0 mió.kr. netto til rakstur og 143,1 mió.kr. til íløgur. Eisini verður mælt til, at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 20/01383-4.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

## 109/20 Kommunuætlanin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 110/17 | 15/02638-18 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 84/17 | 15/02638-18 |
| 3 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 139/17 | 15/02638-18 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.06.2019 | 30/19 | 15/02638-18 |
| 5 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 34/19 | 15/02638-18 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 109/19 | 15/02638-18 |
| 7 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 53/19 | 15/02638-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.09.2019 | 238/19 | 15/02638-18 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 12.09.2019 | 24/19 | 15/02638-18 |
| 10 Eldranevndin | 12.09.2019 | 16/19 | 15/02638-18 |
| 11 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 63/20 | 15/02638-18 |
| 12 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 15/20 | 15/02638-18 |
| 13 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 25/20 | 15/02638-18 |
| 14 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 89/20 | 15/02638-18 |
| 15 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.03.2020 | 9/20 | 15/02638-18 |
| 16 Økisnevndin | 09.03.2020 | 3/20 | 15/02638-18 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 14.05.2020 | 17/20 | 15/02638-18 |
| 18 Eldranevndin | 14.05.2020 | 1/20 | 15/02638-18 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 141/20 | 15/02638-18 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.05.2020 | 84/20 | 15/02638-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 137/20 | 15/02638-18 |
| 22 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 109/20 | 15/02638-18 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunuætlanin er yvirskipaða stýringsamboðið fyri planlegging og menning av Tórshavnar kommunu. Kommunuætlanin sambindir strategiir, ætlanir, verkætlanir og leiðreglur, sum saman skapa karmarnar fyri menning í kommununi.

Sostatt lýsir kommunuætlanin mál og stevnumið hjá býráðnum fyri framtíðarmenning í kommununi, eitt nú fólkavøkstur og tænastustøði, umframt mál fyri fysisku planleggingina, eitt nú hvussu kommunan skal vaksa, býti millum bústaðir, vinnumenning, eldraøkið, infrakervi, náttúruvernd, landbúnað o.s.fr.

Kommunuætlanin byggir á visjónina hjá býráðnum við samgonguskjalinum sum grundarlag.

Altso er kommunuætlanin ein heildarætlan og fevnir um ráðlegging fyri eitt tíðarskeið á ávikavist 4 ár og 12 ár. Strategiskar ætlanir og langtíðarætlanir kunnu tó strekkja seg yvir eitt longri tíðarskeið.

Kommunuætlanin skal fevna um alla kommununa, og verður hon dagførd 4. hvørt ár.

Verandi kommunuætlan er frá 2014. Ætlanin er at henda tekur við 1. januar 2020.

**Mentanarøkið:**
Sum liður í tilgongdini við gerð av dagførdari kommunuætlan er uppskot gjørt viðvíkjandi serligum viðurskiftum o.a. innan grein 4 fólkaskúlar og grein 5 mentan og ítróttur. Sí hjálagt uppskot.

Á fundinum fer umsitingin at leggja fram yvirornað um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið við atliti til at umsitingin lagar uppskotið til í víðari tilgongdini til eitt samlað rit sum verður lagt fyri í summar.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at dagføra kommunuætlanina, hevur verið arbeitt við evninum 'Fólk og Vøkstur', sí viðhefta skjal, Kommunuætlan BB-nevndin. Umframt evni 'Fólk og vøkstur', verður arbeitt við hesum evnum:

- Náttúra sum frítíðarstaður
- Umhvørvið
- Vinna
- Infrakervi og teknikkur
- Eldraøkið
- Børn og ung
- Mentan
- Sosialaøkið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at umrøða viðhefta uppskot við atliti til, at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Málið umrøtt.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Barna- og ungdómsøkið
Sum liður í tilgongdini við gerð av dagførdari kommunuætlan er uppskot gjørt viðvíkjandi serligum viðurskiftum o.a. innan grein 3 Barna- og ungdómsøkið. Sí hjálagt uppskot.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at dagføra kommunuætlanina er tikið upp aftur, og er avgjørt at skipa kommunuætlanina í 6 evnir. Hesi eru:

1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna
4. Undirstøðukervi
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Evnið 'Fólk og bústaðir' fevnir í høvuðsheitum um lýsing av leiðreglum innan bústaðarbygging og býarmenning, framskriving av fólkavøkstri og ávísing av hóskandi økjum til býarvøkstur.

Evnið 'Náttúra, varðveiting og umhvørvi' fevnir í høvuðsheitum um lýsing av leiðreglum og arbeiðslagi innan náttúruvernd, varðveiting av friðaðum bygningum og býarumhvørvum og innan orku- og umhvørvispolitikk hjá Tórshavnar kommunu.

Evnið 'Vinna' fevnir í høvuðsheitum um lýsing av vinnulívi í Tórshavnar kommunu og leiðreglum innan staðseting av vinnulívi og nýggjum vinnuøkjum.

Evnið 'Undirstøðukervi' fevnir í høvuðsheitum um planlegging av Tórshavnar kommunu í mun til vegir og ferðslu og í mun til tekniskar leiðingar, so sum kloakk, vatnveiting o.a.

Evnið 'Mentan, frítíð og útilív' snýr seg í høvuðsheitum um skipan av mentan og frítíðarvirksemi í kommununi, bæði innan- og uttandura.

Evnið 'Tænastuøkið' snýr seg í høvuðsheitum um lýsing av kommunalu tænastuni innan økini *Børn og ung, Heilsu og umsorgan og Sosialøkið*, nú og frammi í tíðini.

Tíðarætlanin fyri gerð av kommunuætlanini er soljóðandi:

- Framløga av evnum 1, 2 og 3 (juni)
- Framløga av evnum 4, 5 og 6 (september)
- Liðuggerð av evnum og uppseting til hoyring (september)
- Almenn hoyring (ultimo september / primo oktober)
- Viðgerð av innkomnum viðmerkingum (ultimo oktober)
- Endalig redigering og framløga í fíggjarnevnd (november)
- Endalig samtykt í býráðnum (november/desember)

Fyrstu trý evnini verða nú løgd fyri nevnd til kunning og umrøðu. Hesi eru:
1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna

Evni 1, 2 & 3 skulu til kunning og umrøðu í byggi- og býarskipanarnevndini
Evni 2 skal til kunning og umrøðu í náttúru- og umhvørvisnevndini
Evni 3 skal til kunning og umrøðu í vinnunevndini

**Skjøl:**
- Lesivegleiðing til kommunuætlanina, sí skjal nr. 15/02638-40
- Evni 1: Fólk og bústaðir, sí skjal nr. 15/02638-41
- Evni 2: Náttúra, varðveiting og umhvørvi, skjal nr. 15/02638-42
- Evni 3: Vinna, sí skjal nr. 15/02638-43

Til fundirnar verða evnini løgd fram, og er ynskiligt at viðmerkingar verða at umrøða á fundunum, og annars at viðmerkingar verða sendar umvegis journalina at umrøða og raðfesta.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, virkandi leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla ávikavist byggi- og býarskipanarnevndini, náttúru- og umhvørvisnevndini og vinnunevndini til at umrøða evnini við atliti at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. juni 2019:** Umrøtt.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Rógvi Nybo, samskipari legði teir tríggjar fyrstu partarnar av kommunuætlanini fram:

1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna

**Ískoyti:**
Sum liður í arbeiðinum at dagføra kommunuætlanina, verða tey seinastu trý evnini av Kommunuætlanini løgd fyri nevnd til kunning og umrøðu. Hesi eru:

4. Undirstøðu- og infrakervið
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Evni 4 skal til kunning og umrøðu í Teknisku nevnd.
Evni 5 skal til kunning og umrøðu í Mentanarnevndini.
Evni 6 skal til kunning og umrøðu í Trivnaðarnevndini.

**Skjøl:**

- Lesivegleiðing til kommunuætlanina, sí skjal nr. 15/02638-40
- Evni 4: Undirstøðu- og infrakervið, sí skjal nr. (15/02638-49)
- Evni 5: Mentan, frítíð og útilív, sí skjal nr. (15/02638-50)
- Evni 6: Tænastuøkið, sí skjal nr. (15/02638-51)
- Til fundirnar verða evnini løgd fram, og er ynskiligt at viðmerkingar verða at umrøða á fundunum, og annars at viðmerkingar verða sendar umvegis journalina at umrøða og raðfesta.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini, leiðarin á umhvørvisdeildini, leiðarin á mentamáladeildini og leiðarin á barna- & ungdómsdeildini mæla ávikavist Teknisku nevnd, Mentamálanevndini og Trivnaðarnevndini til at umrøða evnini við atliti til at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Mentamálanevndin 09. september 2019:** Umrøtt.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Umrøtt.

**Eldranevndin 12. september 2019:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 12. september 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Uppskot til kommunuætlan 2020 verður við hesum lagt fyri fíggjarnevndina at beina í nevndir til hoyringar.

Tá ið kommunuætlanin hevur verið í fíggjarnevndin aftur og samtykt í býráðnum, er ætlanin at senda uppskot til kommunuætlan 2020 í almenna hoyring í 6 vikur.

**Lýsing av Kommunuætlan 2020:**
Kommunuætlanin er yvirskipaða stýringsamboðið fyri planlegging og menning av Tórshavnar kommunu.

Kommunuætlanin vísir, á hvørjum grundarlagi og innan hvørjar karmar avgerðir verða tiknar um lendisnýtslu í kommununi og hvørji atlit skulu takast og vigast upp móti hvørjum øðrum, tá avgerðir skulu takast um lendisnýtslu.

Kommunuætlanin samantvinnar landslógir um eitt nú býarskipan, vegir, náttúru- og umhvørvisvernd og almennar tænastur við politikkir hjá kommununi um bústaðir, umhvørvi og orku, parkering, frítíð og ítrótt, eldrapolitikk og barna- og ungdómspolitik. Harumframt lýsir kommunuætlanin framtíðar tørv á bústøðum, vegum, dagstovnum og skúlum, ellis- og røktarheimum og so framvegis.

Ein kommunuætlan hyggur ávikavist fýra og 12 ár fram. Ætlanin við eini kommunuætlan er, at hon skal dagførast fjórða hvørt ár, og at hvørt býráð skal meta, um tann galdandi kommunuætlanin skal dagførast lutvíst ella heilt.

Hetta merkir eisini at ein dagførd kommunuætlan natúrliga byggir víðari á nógv av tí, ið var í fyrru kommunuætlanini, og sum framvegis er galdandi.
Stórar broytingar eru farnar fram í samfelagnum og serliga í Tórshavnar kommunu síðan seinastu kommunuætlan. Talan er tí í stóran mun um eina heilt nýggja kommunuætlan, sum tó byggir víðari á fyrstu kommunuætlanina frá 2014.

Høvuðsbroytingarnar við kommunuætlan 2020 eru, at hon er munandi meira víðfevnd enn tann fyrra, hon er býtt sundur í seks evni og hon viðgerð munandi fleiri politikkøki enn fyrra kommunuætlanin.

Kommunuætlan 2020 er býtt sundur í hesi evni, sum verða viðgjørd hvør sær og kunnu lesast einsæris:
1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna
4. Undirstøðukervið
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Harumframt er kommunuætlan 2020 gjørd klár til at leggja á ein talgildan pall hjá Tórshavnar kommunu, tá hesin verður klárur saman við nýggju heimasíðuni. Stóri fyrimunurin við hesum er, at øll kort, ið hoyra til kommunuætlanina, verða sjálvvirkandi dagførd so hvørt sum broytingar verða gjørdar og lagdar inn í kortskipanina hjá Tórshavnar kommunu. Stóri fyrimunurin við hesum er at øll, ið nýta kommunuætlanina sum kunningaramboð, fáa dagførdar kortupplýsingar.

Kommunuætlanin er eitt týdningarmikið amboð, sum fyrisiting og politikarar í Tórshavnar kommunu nýta í teirra arbeiði.

Kommunuætlanin er eisini eitt týdningarmikið amboð til kunning til borgarar, fyritøkur, stovnar og áhugafelagsskapir, sum her kunnu fáa vitan og kunning um grundleggjandi viðurskifti í kommununi, hvussu arbeitt verður og hvørjar ætlanir eru fyri framtíðina.

Hon er ætlað øllum teimum, ið so ella so koma í samband við Tórshavnar kommunu, brúka tænastur frá kommununi og merkja tey inntriv, ið verða gjørd av kommununi.

**Tíðarætlan:**
Arbeitt verður fram móti at býráðið kann samtykkja Kommunuætlan 2020 endaliga á býráðsfundi í juni. Til tess at røkka hesum máli verður arbeitt við hesari tíðarætlan:
- 27/2 – Fíggjarnevnd at beina í býráðsnevndir og býráðið til viðgerð
- 9/3 – 25/3 Viðgerð í nevndum og býráðnum
- 26/3 – 7/5 Almenn hoyring í 6 vikur
- 30/3 – 3/4 Borgarafundur um kommunuætlan
- 11/5 – 2/6 Viðgerð av innkomnum viðmerkingum
- 8/6 – 24/6 Endalig samtykt í fíggjarnevndini og býráðnum.

**Hoyringsleistur:**

Skotið verður upp at Uppskot til kommunuætlan 2020 verður lagt til almenna í 6 vikur. Skotið verður upp at uppskotið verður lagt á heimasíðuna hjá kommununi sum eitt talgilt eintak, og at kunnað verður um hetta umvegis heimasíðu, talgildar miðlar og møguliga við tíðindaskrivi til fjølmiðlar.

Harumframt verður mælt til at skipa fyri einum stórum almennum borgarafundi ein av døgunum 1-3. apríl, og at kunnað verður um hetta beinanvegin tá uppskotið verður lagt til almenna hoyring, sí omanfyri.

**Skjøl:**
- Journal nr. 15/02638-69 Uppskot til Kommunuætlan 2020

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniskur stjóri og deildarleiðarin á Býarskipanardeildini mæla fíggjarnevndini at beina uppskot til kommunuætlan 2020 í Teknisku nevnd, Byggi- og býarskipanarnevndina, Vinnunevndina, Mentamálanevndina, Náttúru- og umhvørvisnevndina, Økisnevndina, Trivnaðarnevndina og Eldranevndina og staðbundnu nevndirnar til hoyringar at leggja fyri fíggjarnevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur kommunuætlanina fram

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

Nevndin ynskir at arbeiðið við bygdaætlaninum verður tikið upp so skjótt sum kommunuætlanin er avgreidd.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Framlagt og samtykt at viðgerða málið á eyka mentamálanevndarfundi í apríl.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer til almenna hoyring.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Trivnaðarnevndin 14. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Eldranevndin 14. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

[Gem]

# 110/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mai 2020 | Blað nr.: 450<br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

# 111/20 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |
| 51 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 73/19 | 14/03408-18 |
| 52 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 61/19 | 14/03408-18 |
| 53 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 36/19 | 14/03408-18 |
| 54 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 249/19 | 14/03408-18 |
| 55 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 235/19 | 14/03408-18 |
| 56 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 205/19 | 14/03408-18 |
| 57 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 57/20 | 14/03408-18 |
| 58 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 45/20 | 14/03408-18 |
| 59 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 34/20 | 14/03408-18 |
| 60 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 102/20 | 14/03408-18 |
| 61 Mentamálanevndin | | | 14/03408-18 |
| 62 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 142/20 | 14/03408-18 |
| 63 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 111/20 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum. Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 m$^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 m$^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum m$^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 m$^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 m$^2$ av gólvvídd fyri 11.600 m$^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tímæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum (eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**

Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F

c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið

2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

**Ískoyti:**
Viðv. broyting av takbelegningi
Innanhýsis stýrisbólkurin og Stýrisbólkurin fyri skúlan á Fløtum hevur eftir áheitan frá Húsaumsitingini viðgjørt spurningin um, hvørt tað er betri at brúka takpapploysn ístaðin fyri takmembran (takdúk) á tekjuni á oyggjunum (omaná bygningunum 1-7, tó ikki miðøkið). Takpapp er minni viðbreki fyri herverki, skaðum v.m., umframt nakað høgligari at røkja og viðlíkahalda.

Meirkostnaður fyri at skifta frá membrani til papp er 4.056.754 kr. + kommunalt MVG. Innanhýsis stýrisbólkurin mælir til at broyta takbelegningin til takpapp. Í mun til verkætlanina er broytingin at rokna sum eitt tilkeyp og kann tí ikki fara av puljuni til ókent og eiheldur er rúm fyri hesi íløgu á øðrum kontum í verkætlanini. Tí er neyðugt at økja samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina við hesi upphædd.

Ætlandi verður byrjað at leggja takpapp í mars 2019 og tekur tað arbeiðið nakrar mánaðir.

Viðv. innbúgvi og uttandura økið

Sum greitt frá í framløgu í sambandi við viðgerðina í nevndini á sumri 2018 er greitt, at áður gjørd meting í 2016 um kostnaðin av hóskandi innbúgvi v.m. ikki heldur í mun til tað, sum nú verður mett rímiligt. Á fundinum verður innleiðandi greitt frá metingini og atlitunum í málinum. Á einum komandi fundi kemur endalig tilráðing um málið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at leggja takkpapp á bygningin í staðin fyri membran, og í hesum sambandi at hækka samlaða løgukarmin fyri byggiverkætlanina við 4.056.754 kr. + kommunalt MVG at fíggja yvir løgujáttanina í 2020.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 90.000 tkr til verkætlanina, umframt framflyting frá 2018 á 21.970 tkr. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á umleið 110.000 tkr í 2019 til arbeiðstakarar, ráðgevar og byggiharraveitingar og -útreiðslur. Á framflutta løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar eru 18.099 tkr. tøkar., ið tørvar at vera flutt á projektkontuna L41012 Skúlin á Fløtum.

Ískoyti viðv. játtan til innbúgv v.m.

Tekstur er ávegis

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 18.099 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 116.000 tkr til verkætlanina. Á projektkontuni L41012 Skúlin á Fløtum er væntað meirnýtsla á uml. 5 mio.kr. í 2019 (ikki endaliga uppgjørt enn!). Hetta vegna at tað hevur gingið væl at byggja í 2019.

Støðug gongd er á verkætlanini, ið ætlandi endar í ár. Tilgongdin viðv. útboð av innbúgvi og øðrum byggiharraveitingum er farin í gongd og kemur tann spurningur væntandi fyri aftur til viðgerðar í mars 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at játta 116.000 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sbrt. galdandi samtykt hevur verkætlanin 394,8. mio.kr. í játtan. Ætlandi verður byggingin avhendað 26. juni 2020.

Í hjálagda skjali verða lýst útlitini fyri, um samlaða játtanin fer at halda. Niðurstøðan er at í løtuni verður mettur tørvur á meirjáttan svarandi til uml. kr. 5-8 mió.kr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin gera vart við møguligan tørv á meirjáttan at nágreina til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Byggingin av Skúlanum á Fløtum líður væl. Útboð av føstum og leysum innbúgvi hava verið, umframt útboð av KT-skíggjum til floks- og fakstovur. Sum áður kunnað um, hevur kostnaðarmetingin til innbúgv og útgerð, harundir útiútgerð, verið ov tepur.

Orsøkin er millum annað tilkeyp av ídnaðarkøki og skilaveggi í ítróttahøllini, umframt ov lítið er sett av til aktiva útgerð (kt), innbúgv sum heild og ráðgeving til hesar byggiharraveitingarnar.

Sáttmálar stunda til at verða undirskrivaðir, so at innbúgv og útgerð kann verða sett upp sambært tíðarætlanini.

Mett verður, at neyðugt er við kr. 6,82 mió í eykajáttan til innbúgv og útgerð. Greitt verður neyvari frá hesum á fundinum.

Fyrisitingin hevur ikki fígging at vísa á, men vísir á møguleikan við lántøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og verkætlanarleiðarin mæla til at játta kr. 6,82 mió til innbúgv og útgerð til kontu 4176 Nýbygging skúlan L41012 Skúlin á Fløtum um neyðugt fíggjað við lántøku.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass g Gunvør Balle, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð, tó tekur minnilutin ikki undir við at fíggja útreiðsluna við lántøku og mælir til at finna peningin innanfyri verandi íløgukarm.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Heðin Mortensen, Helelna Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð og fíggja útreiðsluna innanfyri verandi íløgukarm.

Uppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystaø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Borgi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 7 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 3 blonkum**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 112/20 Ólavsøkan 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 141/20 | 20/01536-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 112/20 | 20/01536-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við, at korona hevur rakt alheimssamfelagið og Føroyar eru tilmælini frá landinum, at í mesta lagi 100 fólk savnast – við frástøðu. Í sambandi við Ólavsøkuna viðførir hetta avbjóðingar og at vit mugu savnast á annan hátt.

Kommunan ynskir eina so vanliga Ólavsøka sum gjørligt, men vil royna at fáa fólk til at halda Òlavsøku við frástøðu. Ein arbeiðsbólkur er settur at koma við uppskoti til, hvussu hetta kann gerast.

**Ólavsøka í grannaløgum**
Mælt verður til at heita á eigarafeløg og býarpartar um at skipa fyri Ólavsøku í sínum øki. Fyri at eggja teimum til, og fáa tað hugnaligt kring býin, verður skotið upp, at hvørt eigarafelag/býarpartur fær møguleika til at vísa á eitt øki, har tey vilja skipa fyri tiltøkum og søkja um stuðul uppá kr. 10.000 til at leiga tjald, anlegg, grill, bonkar og borð ella annað, tey halda, er neyðugt.

Eigarafeløgini/grannaløgini hava ábyrgdina av sínum tiltaki, og feløgini rudda sjálvi uppeftir sær, men mett verður, at kommunan eisini má rudda upp eftirfylgjandi.

Henda ætlan verður bara tikin í nýtslu, um korona tiltøkini enn eru í gildi, tá ið Ólavsøkan verður hildin.

**Tórhavnar Ítrottarráð**
Tórshavnar Ítrottarráð hevur vanliga tivoli á Skálatrøð.
Fyri at ov nógv fólk ikki skulu fara í býin, verður ikki mett ráðiligt at hava tivoli í ár. Tey missa umleið kr. 500.000 við ikki at kunna selja armbond. Tað er ein stórur missur fyri feløgini. Tí kundi tað verið ein møguleiki, at feløgini fáa aðrar uppgávur í sambandi við Ólavsøkuna og eina samsýning frá kommununi fyri hetta. Hetta kundi til dømis verið at hjálpt eigarafeløgum/grannaløgum at skipa fyri Ólavsøkuni. Um feløgini t.d fáa 20.000 kr. hvør, verður tað ein meirútreiðslu uppá umleið 115.000 kr. meira enn í 2019.

Í 2019 fingu feløgini stuðul á kr. 185.000 til at skipa fyri Tivoli við meira. Tilsamans verður stuðulin til feløgini í 2020 kr. 300.000. Feløgini koma at arbeiða fyri hetta.
**Eyka kostnaður:**
Kommunan brúkar vanliga umleið kr. 800.000 kr. av konto 5310 Mentanartiltøk til útreiðslur í sambandi við Ólavsøkuna. Hetta verður millum annað brúkt uppá trygd, Tórspall, lýsingar, pynta býin. Afturat hesum brúkar reinhaldið uml. 400.000 kr. at halda býin reinan.

Av tí, at býurin framvegis skal pyntast, og ætlanin er at hava konsertir, sum verða varpaðar út, verður ikki mett, at nógv kann sparast her.

Roknað verður við, at ein øðrvísi Ólavsøka verður nakað dýrari:
Um t.d. 50 eigarafeløg/grannaløg skulu hava møguleika fyri at søkja um stuðul uppá 10.000 kr., verður mett at eykakostnaðurin verður fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Samsýning Ítróttarfeløg | 115.000 |
| Ólavsøkustuðul | 500.000 |
| Rudding & rusk | 400.000 |
| Undirhald vm. | 100.000 |

Tilsamans 1.115.000

Hetta kann fíggjast soleiðis:
Kr. 400.000 av konto 5310 Mentanartiltøk við at tað eru færri tiltøk í 2020 enn vanligt
Kr. 100.000 av konto 5361 Millumtjóðagrunnar við at grunnurin møttist umvegis Teams
Kr. 400.000 av konto 1310 Býráðsskrivstovan við at spara eitt starv og
Kr. 100.000 av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið
kr. 115.000 av konto 5366 Stuðul annars.
Tilsamans kr. 1.115.000

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni, kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla Býráðnum umvegis fíggjarnevndina til, at fyrireika eina øðrvísi ólavsøku soleiðis sum víst á omanfyri og fíggja hetta við at flyta kr. 100.000 av konto 5361 Millumtjóðagrunnar, kr. 400.000 av konto 1310 Býráðsskrivstovan, kr. 100.000 av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið og kr. 115.000 av konto 5366 Stuðul annars til konto 5310 Mentanartiltøk, tilsamans kr. 715.000.

Restin á kr. 400.000 verður fíggjað av konto 5310 Mentanartiltøk, sum víst á omanfyri.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Anniku Olsen at játta kr. 715.000 kr. sambært tilmælinum, umframt 400.000, ið verður fíggjað av konto 5310 Mentanartiltøk og taka støðu til innihaldið á Ólavsøkuni á seinni býráðsfundi.

Broytingaruppskotið einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 113/20 Økt reingerð á dagstovnaøkinum í sambandi við koronasmittufyribyrging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 143/20 | 20/01634-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 113/20 | 20/01634-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá borgarstjóranum um møguliga ískoytisjáttan til dagstovnaøkið vegna økt reingerðarkrøv í sambandi við koronasmittu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við, at dagstovnar og frítíðarskúlar lótu uppaftur, gjørdi Koronaráðgevingin smittufyribyrgjandi vegleiðingar, sum høvdu við sær, at virksemið á stovnunum mátti umskipast og tillagast samsvarandi vegleiðingunum.

Krøv vórðu m.a. um økta reingerð, sum kravdi at broyta arbeiðgongdir inn á einstøku stovunum. Vesini skulu verða vaskað minst tvær ferðir um dagin, vesikummusetur skulu verða vaskað og síðani avsprittað minst tvær ferðir um dagin. Øll borð og kontakpunkt skulu verða vaskað og sóttreinsað minst tvær ferðir um dagin – sum dømi kunnu nevnast kranar, borðyvirflatur, handtøk, køliskápslúkur/handtøk, rimaverk, stólarmar, kontaktir o.s.fr. Leikur skulu verða vaskaðar fleiri ferðir um dagin. Teldlar skulu verða turkaðir við sprittserviettum fleiri ferðir um dagin, og ímillum hvørja ferð teir verða nýttir. Hendurnar skulu vaskast bæði áðrenn og eftir nýtslu. Knappaborð og mús til teldu skulu dagliga verða vaskað við einnýtislappum, sum reingeringarevni er latið í.

Harumframt eru reinføriskrøvini, tvs. at vaska hendurnar bæði hjá børnum og starvsfólkum fleiri ferð um dagin.

Serliga síðani stovnarnir aftur fóru at fyllast, hava broyttu arbeiðsgongdirnar vegna koronatilmælini havt við sær eyka trýst á arbeiðsorkuna á einstøku stovunum, har starvsfólkini hava tikið sær av reingerð burturfrá námsfrøðiliga virkseminum annars.

Út frá upplýsingum, sum stovnsleiðslurnar hava latið, ber til at meta um eina miðal tímanýtslu pr. dag á einstøku vøggu- og barnagarðsstovunum og frítíðarskúlaflokkunum. Sí útrokningar, sum fevna um 20 arbeiðsdagar, ið samlað gevur ein upphædd á kr. 839.500 (rundað).

Metast má, at støðan viðvíkjandi koronasmittuni og tey atlit, sum stovnarnir skulu taka, kunnu broytast. Ein ískoytisjáttan í verandi støðu leggur ikki grundarlagið fyri játtan longur fram í tíð, men verður at taka upp so hvørt tørvur kann metast vera á tí.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 839.500 til stovnarnar sum ískoyti til eykaútreiðslur vegna økta reingerð fíggjað av tøkum peningi.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at játtanin verður fíggjað av konto 20910 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 114/20 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 15/20 | 19/04118-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 17/20 | 19/04118-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 97/20 | 19/04118-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 114/20 | 19/04118-2 |

**Upprunin til málið:**
Á býráðsfundi hin 16. mai 2019 varð samtykt at geva tilsøgn til, at vindmyllur kunnu byggjast í Flatnahaga, m.a. treytað av at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri økið, tá greitt var, hvør hevði vinnandi boðið, sí mál *Lendi til vindmyllulund.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útbygging av grønari orku minkar um brúk av dálkandi orkukeldum og mett verður, at tað er hóskandi at seta fleiri vindmyllur í øki, sum frammanundan hevur vindmyllur.

Ætlanin er at seta 6 vindmyllur av slagnum Enercon E82 upp í økinum. 76 m eru upp til tornið á hesum og breiddin á veingjunum er 82 m. Soleiðis eru tær nakað størri enn vindmyllurnar í Húsahaga, sum eru 67 m.

Økið, sum ætlanin er at seta vindmyllur á, er sambært kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki áðrenn 2030. Tó kann hugsast, at økið sum frálíður verður partur av býarvakstrarøki. Tryggjast má, at økið kann inndragast aftur, og at umsøkjari ruddar alla útgerð og bygging av økinum, um Tórshavnar kommuna hevur aðrar ætlanir á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Øki liggur í 4. Grundumráði, sum m.a. hevur hesar ásetingarnar:

*§ 26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 1, pkt. e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.*

*Pkt. f. Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 25, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á økinum í Flatnahaga er teknisk útgerð, sum Arktisk Kommando hevur ræði á, og leigusáttmála á lendinum. Tryggjast má, at vindmyllulundin ikki órógvar virksemið hjá Arktisk Kommando, ella at onnur loysn verður funnin.

Ein dynamitgoymsla er í økinum í Flatnahaga.
Tryggjast má, at virksemi á økinum ikki gongur útyvir trygdina av goymsluni. Um hetta ikki kann tryggjast, má onnur loysn til dynamitgoymslu finnast.

Gomul ríðigøta er í økinum, og skal framvegis kunna brúkast.
Til ber at umleggja ríðigøtuna í samstarvi við reiðfólk. Smb umsøkjara, er ongin trupulleiki um ríðigøtan fer ígjøgnum vindmyllulundina.

Byggisamtyktarøkið heldur seg uttanfyri friðingarlinjuna fram við Sandá.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse: Fyrispurningur vegna SEV um uppsetan av fleiri vindmyllum á Bøllureyni,* journal nr.19/01460.
- *Lendi til vindmyllulund,* journal nr. 19/01609.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild:

- Møguleikin fyri óhappi, og at dálking kann ávirka vatngóðskuna í byrgingini í Havnardali er lítil. Vandin er størri í byggifasuni, enn tá ið projektið er liðugt. Vandin liggur í, at olja so ella so kann seta oman í vatnbrunnin. Mælt verður til at nýta sama atlit móti møguligari dálking, sum var nýtt tá fyrra vindmyllulundin var gjørd.
- Mett verður, at tað er nøktandi við einum vegi, sum er 4 m breiður.

Málið er sent til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum. Náttúrufriðingarnevndin hevur givið loyvi, men bíða verður eftir endaligum loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.

Málið hevur verið til hoyringar hjá Landsverki, sum ikki hevur nakra viðmerking til íbindingina.

Umsøkjari samskiftir við Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse um møguleikan fyri at hava vindmyllulund í sama øki sum antennurnar.

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga,* journal nr. 19/04118-10.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Flatnahaga, treytað av loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk, og at ein avtala fæst við Forsvarsministeriets Ejendomsstyrelse og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina av serstøku byggisamtyktini, sum var 6. februar 2020 til 19. mars 2020, komu tríggjar viðmerkginar inn. Allar vóru frá pørtum, sum hava antennur og sendarar í økinum: NET, Forsvarsministeriet Ejendomsstyrelse og Søfartsstyrelsen.

Í sambandi við viðgerðina av staðseting av vindmyllum í Flatnahaga, hevur umsitingin eisini biðið Umhvørvisstovuna um at lýsa avleiðingarnar í mun til bústaðabygging, um vindmyllur verða staðsettar sambært umsóknini.

Greiningarnar vísa, at partur av byggisamtyktarøki A1 liggur innanfyri økið, har ljóðstøðið sambært ásetingunum ikki hóskar til bústaðabygging.

Staðsetingin av vindmyllunum kann ikki endaliga staðfestast, fyrr enn boriroyndir eru gjørdar í økinum, men vil Magn leggja seg eftir, at ljóðviðurskiftini órógva A1 øki minst møguligt, t.v.s. staðseta vindmyllurnar so norðarlaga sum til ber.

Kommunan hevur ikki í løtuni ítøkiligar ætlanir um at byggja bústaðir á hesum byggisamtyktarøki A1, men innan 20 ár er ikki óhugsandi at bygt verður á hesum øki.

Livitíðin fyri vindmyllurnar er 20 ár. Partur av treytunum í avtaluni við Magn er, at vindmyllurnar verða burturbeindar aftaná 20 ár.
Tí verður mælt til, at ljóðmátarar verða uppsettir í norðara parti av A1 økinum, so ljóðviðurskiftini verða skrásett.

Síggjast má burtur frá, at bústaðabygging verður á hesum parti av byggisamtyktarøki A1 í hesum tíðarbili, inntil ljóðkanningar staðfesta nøktandi ljóðstøði í økinum.
T.v.s. at mælt verður til, at frávik verður givið umsøkjara frá at halda ásettu ljóðkrøv innan hendan part av A1 økinum.
Tekniskar kanningar eru í gongd, sum skulu vísa, hvørja ávirkan vindmyllurnar hava á sendararnar. Ein loysn kundi verið at sett eina áseting í tí serstøku byggisamtyktina, um at tryggjast skal, at sendararnar ikki verða ávirkaðir av myllunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja serstøku byggisamtyktina, treytað at neyðug loyvi verða givin frá avvarðandi myndugleikum, og at loysn er funnin í samstarvi við eigarum av útgerð í økinum, við teirri treyt, at vindmyllurnar verða burturbeindar eftir 20 ár, um tað vísir seg, at vindmyllurnar eru í andsøgn við ætlaða bygging í økinum tá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

# 115/20 Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Vælveruhús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 26/20 | 20/00198-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 96/20 | 20/00198-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 115/20 | 20/00198-3 |

**Upprunin til málið:**
Hotel Føroyar eru í gongd við eina umfatandi útbygging av verandi hotelli, soleiðis at hotellið kemur at hava íalt 200 kømur eftir útbyggingina, sum eftir ætlan verður liðug á sumri 2020.

Í sambandi við útbyggingina, verður ein vælverudepil gjørdur í niðaru hædd í nýggju útbyggingini, á uml. 500 fermetrar. Vælverudepilin, sum í høvuðsheitum hýsir umklæðing, massagu, yoga og ymiska viðgerð, kemur at hava egna inngongd frá parkeringsøkinum vestan fyri hotellið.

Afturat hesum vælveruparti inni í hotellinum, ynskir hotellið at gera eitt minni sjálvstøðugt vælveruhús, á uml. 300 $m^2$, sunnan fyri hotellið, oman móti viðarlundini, sum skal hýsa tí 'váta' partinum av deplinum.

Tankin er, at almenningurin hevur atgongd til vælverudepilin, ikki bert gestir á hotellinum.

Fyri einum 3-4 árum síðani arbeiddi Gist og Vist við eini verkætlan um at leggja matstovuna KOKS í hettar økið sunnan fyri hotellið. Fyri at fáa bygningin at liggja so lágt í lendinum sum gjørligt, so varð byggisamtyktin fyri økið broytt, soleiðis at áleið 220 $m^2$ av ikki gróðursettum D1 øki á matr. nr. 1229 vóru lagdir út til C2 økið.

Ósbjørn Jacobsen Arkitektar søkja vegna Gist og Vist um:
• At sleppa at staðseta omanfyri nevnda vælveruhús áleið á sama stað, sum undanfarna KOKS verkætlan varð staðsett, tað vil siga at G&V framhaldandi sleppur at gera nýtslu av hesum 220 fermetrunum í nýggju verkætlanini.
• Prinsipielt byggiloyvi fyri verkætlan sambært viðhefta tilfari, skjal *Vælveruhús_Skitsuuppskot*.

Um so er, at tað er ynskiligt at 220 $m^2$ verða lagdar afturat økinum hjá viðarlundini, av øki hjá G&V, so vil G&V fegin finna eina loysn á tí.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2017 søkti Hotel Føroyar um at fáa loyvi til at byggja KOKS í økinum heilt oman móti viðarlundini í Kerjum – ein partur av hesi ætlan var innanfyri ogn kommununnar og lá í D1 øki og í skógfriðaðum øki, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn*. Tískil var uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki, frá D1 øki til C2 øki sent friðingarmyndugleikanum til hoyringar. 14. desember 2017 gav Yvirfriðingarnevndin, við nøkrum treytum, loyvi til broytingina sí skjal *Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini 13.12.17*, og broytingin varð endaliga góðkend, sí viðhefta skjal *Broyting í almennu byggisamtyktini 14.03.17*.

Í sambandi við at tað alment kom fram, at ætlanirnar um at byggja KOKS í økinum við viðarlundina í Kerjum vóru sleptar, sendi Skógfriðingarnevndin hin 30. august 2018 kommununi eina áheitan um at broyta økið aftur til eitt D1 øki, av tí at fyrra loyvið var tengt at tí nágreiniliga virkseminum. Hesum tók Tórshavnar kommuna undir við og gav tilsøgn fyri, at økið varð broytt aftur til eitt D1 øki í sambandi við endurskoðanina av almennu byggisamtyktini. Somuleiðis varð tilsøgn givin Yvirfriðingarnevndini um, at Hotel Føroyar vórðu bidnir um at flyta vælverudepilin út um markið, og at málið varð sent friðingarmyndugleikanum til góðkenningar, áðrenn byggiloyvi varð givið, sí skjal *Hoyringssvar til Yvirfriðingarnevndina 09.04.19*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri C2 øki eru m.a.:
- Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaðaendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t.

Ásetingarnar fyri D1 øki eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at tilsøgn er givin Yvirfriðingarnevndini um, at økið, sum søkt verður um at byggja vælverudepilin á, verður broytt aftur til eitt D1 øki, má málið viðgerast, sum lá tað í D1 øki. Tískil verður mælt til, at vælverudepilin verður fluttur, soleiðis at hann liggur á matr. nr. 1175d og innanfyri C2 økið.

Um umsøkjarin framvegis ynskir at staðseta vælverudepilin inn á matr. nr. 1229, soleiðis sum tekningarnar í skjali *Vælveruhús_Skitsuuppskot vísa,* so má málið viðgerast av nýggjum, og sendast friðingarmyndugleikanum til nýggja hoyring.

Umsøkjarin hevur víst á øki, á leið 2000 fermetrar, ið plantast kann á, í staðin fyri økið sum liggur í skógfriðaða økinum, teir ynskja at byggja á.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn,* journal nr. 17/00940.
- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn,* journal nr. 18/03313.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
- *Vælveruhús_Skitsuuppskot,* journal nr. 20/00198-7.
- *Broyting í almennu byggisamtyktini 14.03.17,* journal nr. 20/00198-8.
- *Hoyringssvar til Yvirfriðingarnevndina 09.04.19,* journal nr. 20/00198-9.
- *Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini 13.12.17,* journal nr. 20/00198-10.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at geva umsøkjaranum boð um, at vælverudepilin skal flytast, soleiðis at hann liggur á matr. nr. 1175d og innanfyri C2 økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at fara á ástaðarfund saman við umboði frá Skógfriðingarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Ískoyti:**
20. mars 2020 var byggi- og býarskipanarnevndin á ástaðarfundi saman við umboði frá Skógfriðingarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at ganga umsóknini á møti.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum og krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Gunvør Balle og Turid Horn.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Jákup Dam.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 22:30</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |